# LANDSGRANNSKOÐANIN

## Fíggjarárið 2009

Frágreiðing
til løgtingsgrannskoðararnar
um frávik millum játtan og nýtslu

JUNI 2010

## Innihaldsyvirlit


**0 INNGANGUR 7**

**1 GÓÐKENNING AV ROKNSKAPUNUM 9**

**2 LØGMANSFYRISITINGIN 13**

**2.1 FRÁVIK 13**

**3 FÍGGJARMÁL 15**

**3.1 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 15**
3.1.1 RENTUSTUDNINGUR TIL HÚSABYGGING (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 3.22.1.01. 15
3.1.2 LÆRARAEFTIRLØNIR (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 3.23.2.07. 15
3.1.3 FAS-ENDURGJALD (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 3.35.1.05. 15
**3.2 RENTUR/FRÁVIK 16**
3.2.1 RENTUR AV LANDSINS SKULD 20.50.1. 16
3.2.2 MILLUMVERANDI VIÐ TJÓÐBANKAN OG LANDSBANKAN 20.50.2. 16
**3.3 INNTØKUR/FRÁVIK 17**
3.3.1 SKATTAINNTØKUR 20.52.1. 17
3.3.2 AVGJØLD OG TOLLUR 20.52.2. 18
3.3.3 YMISKAR INNTØKUR 20.52.3. 18
3.3.4 AÐRAR INNTØKUR 20.52.3.10. 19
3.3.5 ENDURRINDAN AV KEYPS-MVG 20.52.5. 19
3.3.6 HEILDARVEITING O.T. 20.54.1. 19
3.3.7 SERINNTØKUR, FÍGGJARMÁL 53.21.7. 20
3.3.8 SERINNTØKUR, VINNUMÁL 56.21.1. 20
**3.4 AÐRAR VIÐMERKINGAR 21**
3.4.1 ÓGREIÐA UM JÁTTANIR TIL FELAGS VIÐLÍKAHALD 21
3.4.2 FYRISITINGARÚTREIÐSLUR VERÐA SPJADDAR 21
3.4.3 ENDURRINDAN AV TÆNASTUMANNAEFTIRLØNUM 22
**3.5 JÁTTANARVIÐURSKIFTI 22**
3.5.1 JÁTTANARSKIPANIN 22
3.5.2 JÁTTANARLÓGIN 23

**4 FISKIVINNUMÁL 27**

**4.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 27**
4.1.1 VEÐURTÆNASTAN (RAKSTRARJÁTTAN) 5.31.1.07. 27
4.1.2 HAVSTOVAN (RAKSTRARJÁTTAN) 5.34.3.01. 27
4.1.3 ÚTLÁN (STUÐULSJÁTTAN) 5.34.5.01. 28
4.1.4 TRYGDARMIÐSTØÐIN (RAKSTRARJÁTTAN) 5.35.1.03. 28
**4.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 29**
4.2.1 ALMENN JØRÐ, SØLA (LØGUJÁTTAN) 5.33.2.11. 29
4.2.2 INNTØKUTRYGD HJÁ FISKIMONNUM (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 5.34.4.01. 29

**5 VINNUMÁL 31**

**5.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 31**
5.1.1 P/F FISKAALING (STUÐULSJÁTTAN) 6.36.1.05. 31
5.1.2 UMBYGGING AV HEILSUFRØÐILIGU STARVSSTOVUNI (LØGUJÁTTAN) 6.37.5.05. 31
5.1.3 LÁNSAFTURGJALD (STUÐULSJÁTTAN) 6.37.6.01. 31
5.1.4 POSTVERK FØROYA, EFTIRLØNIR (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 6.38.3.08. 32
5.1.5 BARSILSSKIPANIN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 6.39.4.01. 32
5.1.6 UMSITING AV BARSILSSKIPANINI (RAKSTRARJÁTTAN) 6.39.4.04. 33
**5.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 34**
5.2.1 JARÐFEINGI (RAKSTRARJÁTTAN) 6.32.1.03. 34
5.2.2 AVTØKA AV ENDURGJALDSGRUNNI ALIVINNUNNAR (STUÐULSJÁTTAN) 6.36.1.13. 34
5.2.3 SKRÁSETING FØROYA (RAKSTRARJÁTTAN) 6.37.1.18. 34
5.2.4 STRANDFARASKIP LANDSINS (LØGUJÁTTAN) 6.38.2.02. 35

**6 MENTAMÁL 37**

**6.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 37**
6.1.1 PRÓVTØKUR (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.1.31. 37
6.1.2 GJALD FYRI LÆRUSÁTTMÁLAR O.A. (STUÐULSJÁTTAN) 7.23.3.15. 37
6.1.3 STUDENTASKÚLIN Í HOYDØLUM (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.28. 37
6.1.4 LESTRARSTUÐUL (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 7.23.7.04. 38
6.1.5 LEIKLIST (RAKSTRARJÁTTAN) 7.24.2.06. 39
6.1.6 KRINGVARP FØROYA (LANDSFYRITØKA) 7.24.4.06. 39
6.1.7 LÁNSAFTURGJALD (STUÐULSJÁTTAN) 7.24.8.01. 39
**6.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 40**
6.2.1 EFTIRSKÚLAR (LØGUJÁTTAN) 7.23.2.10. 40
6.2.2 MIÐNÁMSÚTBÚGVINGAR (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.3.05. 40
6.2.3 TEKNISKI SKÚLI Í KLAKSVÍK (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.07. 40
6.2.4 FISKIVINNUSKÚLIN (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.08. 40
6.2.5 STUDNINGUR TIL LÆRUPLÁSS (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 7.23.3.14. 41
6.2.6 ÍTRÓTTAHØLL Á SANDOYNNI (LØGUJÁTTAN) 7.24.6.13. 41
6.2.7 KRINGVARPSSENDISTØÐIR (LØGUJÁTTAN) 7.38.3.10. 42

**7 HEILSUMÁL 43**

**7.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 43**
7.1.1 KOMMUNULÆKNASKIPANIN (RAKSTRARJÁTTAN) 11.20.2.04. 43
7.1.2 APOTEKSVERKIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 11.20.2.08. 43
7.1.3 LANDSSJÚKRAHÚSIÐ, ÚTBYGGING (LØGUJÁTTAN) 11.20.3.08. 45
7.1.4 SUÐUROYAR SJÚKRAHÚS (RAKSTRARJÁTTAN) 11.20.3.15. 46
7.1.5 SERVIÐGERÐ UTTANLANDS (RAKSTRARJÁTTAN) 11.20.3.20. 46
7.1.6 VIÐGERÐARSTOVNURIN HEILBRIGDI (RAKSTRARJÁTTAN) 11.20.4.02. 47
**7.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 49**
7.2.1 KOPPSETINGAR (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 11.20.1.10. 49
7.2.2 SJÚKRAKASSAR (STUÐULSJÁTTAN) 11.20.2.01 49

**8 ALMANNAMÁL 51**

**8.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 51**
8.1.1 BARNAPENINGUR VEITTUR Í FORSKOTI (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 12.21.3.04. 51
8.1.2 STUÐUL TIL UPPIHALDSPENING (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 12.21.3.05 51
8.1.3 FÓLKAPENSJÓN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 12.21.8.01. 52
8.1.4 FYRITÍÐARPENSJÓN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 12.21.8.05. 52
**8.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 54**
8.2.1 DUGNI-SKÚLIN (LØGUJÁTTAN) 12.21.1.09. 54
8.2.2 DAGPENINGASKIPANIN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 12.21.4.01. 54
8.2.3 SERFORSORG (RAKSTRARJÁTTAN) 12.21.6.01. 55
8.2.4 BÚSTOVNAR O.A. (LØGUJÁTTAN) 12.21.6.02. 56
8.2.5 ELDRARØKT (RAKSTRARJÁTTAN) 12.21.6.04. 57
8.2.6 LÁN TIL ELLIS- OG RØKTARHEIM Í VÁGI (LØGUJÁTTAN) 12.21.6.14. 58
8.2.7 ELDRASAMBÝLI (LØGUJÁTTAN) 12.21.6.16. 59
8.2.8 VANLIG FORSORG (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 12.21.7.01. 59

**9 INNLENDISMÁL 61**

**9.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 61**
9.1.1 UMVÆLING AV ALMENNUM BYGNINGUM (LØGUJÁTTAN) 15.11.1.56. 61
9.1.2 UMHVØRVISSTOVAN (RAKSTRARJÁTTAN) 15.37.4.02. 65
9.1.3 ORKUNÝTSLA Í ALMENNUM BYGNINGUM (LØGUJÁTTAN) 15.37.4.10. 65
9.1.4 ALMENNAR VIÐMERKINGAR TIL LØGUJÁTTANIR TIL BYGNINGAR 69
**9.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 71**
9.2.1 NÝGGIR LANDSVEGIR (LØGUJÁTTAN) 15.38.1.07. 71
9.2.2 STUÐUL TIL INFRAKERVIÐ Á ÚTOYGGJUM 15.38.1.18. 72
9.2.3 SANDOYARTUNNIL (LØGUJÁTTAN) 15.38.2.23. 72

**10 UTTANRÍKISMÁL 73**

**10.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 73**
10.1.1 SAMVIT (RAKSTRARJÁTTAN) 16.37.1.03. 73

**11 SAMLAÐ YVIRLIT MEIR-/MINNINÝTSLA 75**

# 0 Inngangur

Yvirskipaðu reglurnar um grannskoðan av landsroknskapinum eru ásettar í § 45 í stýrisskipanarlógini. Neyvari reglur eru ásettar í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." (grannskoðanarlógin).

Sambært § 11, stk. 3, í grannskoðanarlógini skal hvør landsstýrismaður, í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, greiða løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frá um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl.

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið tilfarið fyri 2009, og hevur havt samskifti við avvarðandi landsstýrismenn/aðalráð um ymiskar spurningar.

Við hesum letur Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um frávik millum játtan og nýtslu fyri árið 2009, hóast samlaða ársfrágreiðingin um grannskoðan av landsroknskapinum ikki er liðug. Hetta fyri at Løgtingið í størri mun kann nýta frágreiðingina í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina.

Sambært § 18 kunnu løgtingsgrannskoðararnir lata Løgtinginum frágreiðingina, sum sambært tingskipanini verður viðgjørd eftir § 80, stk. 2, sum skriv til Løgtingið.

Í frágreiðingini hevur Landsgrannskoðanin fyri hvørt málsøki sær víst á og umrøtt høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu í 2009. Í frágreiðingini hava vit eisini tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá avvarandi landsstýrismanni um, hvørjar orsøkirnar eru til frávikini í roknskapinum.

Í frágreiðingini verða eisini umrødd onnur viðurskifti, ið viðvíkja grannskoðanini av landsroknskapinum.

Sambært landsroknskapinum eru høvuðstølini fyri fíggjarárið 2009:

mió.kr.

| Landsroknskapurin 2009 | Játtan | Roknskapur |
|---|---:|---:|
| Inntøkur | 4.662 | 4.575 |
| Útreiðslur | 5.031 | 5.079 |
| Løgur | 225 | 184 |
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsúrslit** | **-594** | **-688** |

Til samanberingar vóru høvuðstølini fyri fíggjarárið 2008:

mió.kr.

| Landsroknskapurin 2008 | Játtan | Roknskapur |
|---|---:|---:|
| Inntøkur | 5.380 | 5.220 |
| Útreiðslur | 5.207 | 5.318 |
| Løgur | 242 | 232 |
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsúrslit** | **-69** | **-330** |

Seinastu árini hevur alsamt størri fokus verið á, hvørt ein landsstýrismaður hevur meirnýtslu á sínum málsøki. Millum annað hetta hevur helst havt við sær, at meirnýtslurnar í 2009 ikki eru eins stórar og undanfarin ár.

Landsgrannskoðanin heldur avgjørt, at kjakið um meirnýtslur er í lagi, men samstundis halda vit tað vera umráðandi at hyggja at, hvat tilfeingið verður brúkt til .

Tað er helst eisini ein av orsøkunum til, at Fíggjarmálaráðið í roknskaparkunngerðini, sum kom í gildi 1. januar 2007, leggur upp til, at aðalráð og stovnar í seinasta lagi 1. januar 2010 skulu hava sett í verk stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit o.t., soleiðis at til ber at lýsa hvat stovnurin avrikar, og hvussu tilfeingið verður brúkt.

Aftast í hesari frágreiðing hevur Landsgrannskoðanin sett upp eitt yvirlit, sum vísir meir- ella minninýtslur á øllum høvuðskontum.

Argir, 30. juni 2010

Beinta Dam

# 1 Góðkenning av roknskapunum

Í roknskaparkunngerðini § 8, stk. 2, stendur, at játtanarroknskapir verða gjørdir fyri hvønn mánað, fyri hvørt ískoytistíðarskeið og fyri fíggjarárið (ársroknskapur).

Í roknskaparrundskrivinum frá februar 2001 stendur í broti 2 ”Roknskaparframløga/-góðkenning”:

> *“Játtanarroknskapurin fyri síðsta roknskaparliga ískoytistíðarskeiðið er samstundis ársroknskapurin, og skal hann verða sendur út til allar stovnar o.o. við fráboðan um, at tað er endaligi ársroknskapurin.”*

## Elektrónisk góðkenning

Í januar 2009 boðaði Fíggjarmálaráðið frá, at elektrónisk “Roknskapargóðkenningarskipan” fór at verða sett í verk í 2009. Mannagongdirnar, at stovnsleiðarar lata aðalráði sínum góðkenningarskjal (EK 76) í pappírsformi, og at aðalráðini lata Fíggjarmálaráðnum góðkenningarskjal (EK 75) í pappírsformi, fóru tískil at halda uppat.

Í oktober 2009 hevur Føroya Gjaldstova boðað frá, at frá september roknskapinum 2009 kann góðkenning av roknskapinum bert fara fram í Roknskapargóðkenningarskipanini (RGS).

## Ársroknskapurin

Seint í februar 2010 boðaði Gjaldstovan í telduposti stovnsleiðarunum frá, at verða stovnarnir ikki varugir við týðandi feilir, er roknskapurin fyri tíðarskeið 13-2009 at rokna sum ársroknskapur.

Í mars 2010 boðaði Gjaldstovan í telduposti stovnsleiðarunum frá, at landsstýrisfólk kundu góðkenna greinaroknskapir, í sambandi við góðkenning av tíðarskeiði 13-2009, til seinast í mars 2010.

Tíðliga í apríl 2010 boðaði Gjaldstovan aðalráðum og stovnum frá, at sera týdningarmikið var at fáa góðkent tíðarskeið 14-2009, sum var sent út seinast í mars 2010, tí tað samstundis var góðkenning av ársroknskapinum fyri 2009. Aðalstjórar og landsstýrisfólk kundu góðkenna greinaroknskapir frá fríggjadegnum 9. apríl til fríggjadagin 16. apríl.

Um hálvan mai 2010 varð landsroknskapurin fyri fíggjarárið 2009 prentaður og latin Løgtinginum.

Sambært yvirliti hjá Fíggjarmálaráðnum í juni 2010 hevur bert Fíggjarmálaráðið hildið ásetingina um at góðkenna ársroknskapin.

**Góðkenningarstøða av stovnum (RGS)[1]:**

| | | Landsstýrisfólk | Fyrivarni | Góðkent | Opin | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 01 | Løgtingið (Opin) | - | 0 | 2 | 7 | **9** |
| 02 | Løgmansfyrisitingin (Góðkent) | - | 0 | 7 | 1 | **8** |
| 03 | Fíggjarmál (Góðkent) | Ja | 0 | 35 | 0 | **35** |
| 05 | Fiskivinnumál (Opin) | - | 0 | 29 | 36 | **65** |
| 06 | Vinnumál (Opin) | - | 6 | 53 | 3 | **62** |
| 07 | Mentamál (Opin) | - | 3 | 90 | 47 | **140** |
| 11 | Heilsumál (Opin) | - | 6 | 34 | 4 | **44** |
| 12 | Almannamál (Góðkent) | Ja | 1 | 83 | 1 | **85** |
| 15 | Innlendismál (Góðkent) | Ja | 0 | 31 | 16 | **47** |
| 16 | Uttanríkismál (Opin) | - | 0 | 0 | 18 | **18** |
| 20 | Inntøkur (Góðkent) | Ja | 2 | 47 | 1 | **50** |
| 25 | Gjaldføri (Góðkent) | Ja | 0 | 4 | 0 | **4** |
| 53 | Serinntøkur, fíggjarmál (Góðkent) | Ja | 0 | 2 | 0 | **2** |
| | Í alt | | 18 | 417 | 134 | **569** |




Á talvuni sæst, at:

- Løgmansskrivstovan hevur góðkent 7 stovnsnummur av 8,
- Fíggjarmálaráðið hevur góðkent øll 35 stovnsnummur,
- Fiskimálaráðið hevur góðkent 29 stovnsnummur av 65,
- Vinnumálaráðið hevur góðkent 53 stovnsnummur av 62,
- Mentamálaráðið hevur góðkent 90 stovnsnummur av 140,
- Heilsumálaráðið hevur góðkent 34 stovnsnummur av 44,

[1] Kelda: Fíggjarmálaráðið

- Almannamálaráðið hevur góðkent 83 stovnsnummur av 85,
- Innlendismálaráðið hevur góðkent 31 stovnsnummur av 47,
- Uttanríkisráðið hevur onki góðkent av teirra 18 stovnsnumrum,

Tá ið havt verður í huga, at góðkenningarnar eru grundarlagið fyri endaliga landsroknskapinum, heldur Landsgrannskoðanin tað als ikki vera nøktandi, at roknskapirnir ikki verða góðkendir sambært ásettu tíðarfreistum.

# 2 Løgmansfyrisitingin

## 2.1 Frávik

Løgmaður hevur kunnað um, at talan bert er um smávegis frávik, sum løgmaður ikki heldur tað vera neyðugt at greiða gjøllari frá.

# 3 FÍGGJARMÁL

Vísandi til § 11, stk. 3, í grannskoðanarlógini spurdi Landsgrannskoðanin í mars 2010 eftir frágreiðing um frávik millum játtan og nýtslu.

Landsstýrismaðurin hevur í juni 2010 svarað, at tað samanumtikið er at fegnast um, at endamálið, sum var at steðga meirnýtsluni í rakstrinum, at kalla er rokkið. Tað er eydnast á § 3: Fíggjarmál at koma ígjøgnum 2009 uttan meirnýtslu, og tað sama er galdandi fyri nærum allar útreiðslugreinarnar í fíggjarlógini.

## 3.1 Minninýtsla/frávik

### 3.1.1 Rentustudningur til húsabygging (lógarbundin játtan) 3.22.1.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 825 t.kr. Minninýtslan er 341 t.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 1.650 t.kr. Í eykajáttanarlógini apríl 2009 varð játtanin lækkað 825 t.kr.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina *“verður arbeitt við at taka av hesa skipan frá 1. juli 2009 at rokna.”*

Við løgtingslóg nr. 69 frá 25. mai 2009 “um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn o.a.” varð skipanin tikin av 1. juli 2009.

Landsstýrismaðurin hevur ongar viðmerkingar til minninýtsluna.

### 3.1.2 Læraraeftirlønir (lógarbundin játtan) 3.23.2.07.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 49 mió.kr. Minninýtslan er 1 mió.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 44 mió.kr. Í eykajáttanarlógini apríl 2009 varð játtanin hækkað 4 mió.kr. Í eykajáttanarlógini september 2009 varð játtanin hækkað 1 mió.kr.

Landsstýrismaðurin hevur ongar viðmerkingar til minninýtsluna.

### 3.1.3 FAS-endurgjald (lógarbundin játtan) 3.35.1.05.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 80,3 mió.kr. netto. Minninýtslan er 2,3 mió.kr. netto. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 88,8 mió.kr. netto. Í eykajáttanarlógini apríl 2009 varð játtanin lækkað 4 mió.kr. Í eykajáttanarlógini desember 2009 varð játtanin lækkað 4,5 mió.kr. netto.

Landsstýrismaðurin hevur ongar viðmerkingar til minninýtsluna.

## 3.2 Rentur/frávik

Talvurnar niðanfyri vísa játtan í fíggjarlóg og roknskapartøl fyri rentuútreiðslur og rentuinntøkur í 2008.

### 3.2.1 Rentur av landsins skuld 20.50.1.

mió.kr.

| | Rentuútreiðslur 20.50.1.01. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Rentur at gjalda | 118,0 | 198,4 | 80,4 |
| | **Tilsamans** | **118,0** | **198,4** | **80,4** |

Á talvuni sæst, at rentuútreiðslur av landsins skuld eru 80,4 mió.kr. hægri, enn mett var.

Í viðmerkingunum til fíggjarlógina stendur:

> *"Meginparturin av skuldini til danska statin varð í 2005 umløgd til lánsbrævaskuld.*
>
> *Eftirverandi skuldin til danska statin er tí í dag 500 mió.kr. Hendan skuld er rentufrí og fellur bara til gjaldingar, um olja verður funnin í føroysku undirgrundini áðrenn 2018. Kursvirðið á lánsbrævaskuld landskassans er umleið 2,2 mia. kr.*
>
> *Tilsamans eru rentuútreiðslurnar, íroknað kursbroytingar, av hesari skuld landskassans mettar til 118 mió.kr. í 2009".*

Av órealiseraðum kursjavningum blivu rentuútreiðslurnar, sambært landsstýrismanninum, væl hægri, enn mett var. Ongin støða er tikin til at broyta uppgerðarháttin.

### 3.2.2 Millumverandi við Tjóðbankan og Landsbankan 20.50.2.

mió.kr.

| | Rentuinntøkur 20.50.2. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Rentuinntøkur av innistandandi | 76,0 | 123,0 | 47,0 |
| 04. | Aðrar rentur | 5,0 | 17,3 | 12,3 |
| 07. | Útgoldið yvirskot frá Landsbanka Føroya | 12,8 | 17,4 | 4,6 |
| 10. | Útgoldið yvirskot frá Danmarks Nationalbank | 20,0 | 10,2 | -9,8 |
| | **Tilsamans** | **113,8** | **167,9** | **54,1** |

Undirkonta 01. Rentuinntøkur av innistandandi

Á hesari undirkontu eru meirinntøkurnar 47 mió.kr.

Av órealiseraðum kursjavningum blivu rentuinntøkurnar, sambært landsstýrismanninum, væl hægri, enn mett var. Ongin støða er tikin til at broyta uppgerðarháttin.

Undirkonta 04. Aðrar rentur

Á hesari undirkontu eru meirinntøkurnar 12,3 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum er rentuinntøkan, 11,6 mió.kr., av láninum til íslendska statin, innroknað.

## 3.3 Inntøkur/frávik

Talvurnar niðanfyri vísa játtan í fíggjarlóg og roknskapartøl fyri inntøkur í 2009.

### 3.3.1 Skattainntøkur 20.52.1.

mió.kr.

| | Skattainntøkur 20.52.1. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Vanligur landsskattur: | | | |
| | Vanligur lands- og kommunu-skattur | 2.553,2 | 2.629,4 | 76,2 |
| | Gamal skattur fyri 1. apríl 1984 | - | 0,1 | 0,1 |
| | Skattainntøka frá FAS-skipanini | 88,8 | 76,4 | -12,4 |
| | Flutt til kommunur | -1.237,0 | -1.318,6 | -81,6 |
| | **Vanligur landsskattur tilsamans** | **1.405,0** | **1.387,3** | **-17,7** |
| 06. | Kolvetnisskattur, persónar | 5,0 | 1,3 | -3,7 |
| 07. | Felagsskattur | 180,0 | 102,1 | -77,9 |
| 08. | Kolvetnisskattur, feløg | 3,0 | 4,2 | 1,2 |
| 11. | Kapitalvinningsskattur | 100,0 | 143,7 | 43,7 |
| 13. | Avgjald av kapitaleftirlønum | 16,0 | 27,1 | 11,1 |
| 25. | Arvaavgjøld | 5,5 | 5,8 | 0,3 |
| 28. | Gjald til barsilsskipanina | 90,0 | 84,8 | -5,2 |
| 30. | Gjald frá Búnaðarstovuni | 2,8 | 2,7 | -0,1 |
| | **Tilsamans** | **1.807,3** | **1.759,0** | **-48,3** |

Undirkonta 07. Felagsskattur

Á hesari undirkontu eru minniinntøkurnar 77,9 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum vórðu avleiðingarnar av fíggjarkreppuni størri enn tað, sum var mett í fíggjarlógini.

Undirkonta 11. Kapitalvinningsskattur

Á hesari undirkontu eru meirinntøkurnar 43,7 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum gjørdi TAKS eitt átak, sum hækkaði álíkningina við áleið 60 mió.kr.

### 3.3.2 Avgjøld og tollur 20.52.2.

mió.kr.

| | Avgjøld og tollur 20.52.2. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Meirvirðisgjald | 1.200,0 | 1.149,7 | -50,3 |
| 04. | Tollavgjald | 40,0 | 27,3 | -12,7 |
| 07. | Punktgjald | 180,0 | 177,0 | -3,0 |
| 10. | Lønhæddargjald | 16,3 | 16,6 | 0,3 |
| 13. | Brennioljugjald | 66,0 | 58,7 | -7,3 |
| 16. | Framleiðsluavgjald | 21,0 | 19,6 | -1,4 |
| 19. | Skrásetingargjald | 60,0 | 47,4 | -12,6 |
| 22. | Vegskattur (vektgjald) | 93,0 | 87,1 | -5,9 |
| 25. | Ferðaavgjald | 14,0 | 14,1 | 0,1 |
| 28 | Umhvørvisgjald á smyrjiolju | 4,0 | 1,2 | -2,8 |
| 30 | Tinglýsingargjald | 30,0 | 19,0 | -11,0 |
| | **Tilsamans** | **1.724,3** | **1.617,7** | **-106,6** |

Størstu frávikini, har inntøkurnar vórðu minni enn mett var, eru “Meirvirðisgjald” 50,3 mió.kr., “Tollavgjald” 12,7 mió.kr. og “Skrásetingargjald” 12,6 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum gjørdu avleiðingarnar av fíggjarkreppuni, at avgjalds- og tollinntøkurnar minkaðu meira enn tað, sum mett var í fíggjarlógini, serstakliga fyri meirvirðisgjaldið.

### 3.3.3 Ymiskar inntøkur 20.52.3.

mió.kr.

| | Ymiskar inntøkur 20.52.3. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 04. | Útluting frá almennum partafeløgum | 15,0 | 8,6 | -6,4 |
| 10. | Aðrar inntøkur | 10,5 | 14,0 | 3,5 |
| | **Tilsamans** | **25,5** | **22,6** | **-2,9** |

Undirkonta 04. Útluting frá almennum partafeløgum

Talan er um vinningsbýti frá:

| | |
|---|---|
| P/f FT Samskifti | 5,0 mió.kr. |
| P/f Atlantic Airways | 3,6 mió.kr. |
| **Tilsamans** | **8,6 mió.kr.** |

### 3.3.4 Aðrar inntøkur 20.52.3.10.

t.kr.

| | Aðrar inntøkur 20.52.3.10. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 02. | Skeinkiloyvi, avgjald | 250 | 215 | -35 |
| 04. | Navnaprógv | 10 | 7 | -3 |
| 05. | Bøtur | 700 | 1.094 | 394 |
| 07. | Burturlutingargjald | 1.000 | 1.099 | 99 |
| 09. | Løggilding av el-innleggjarum, avgjald | 300 | 336 | 36 |
| 11. | Víddargjald, oljuvinna | 8.200 | 11.313 | 3.113 |
| 60. | Óvanligar inntøkur | - | -56 | -56 |
| | **Tilsamans** | **10.460** | **14.008** | **3.548** |

Størstu frávikini, har inntøkurnar vórðu størri enn mett var, eru “Víddargjald” 3.113 t.kr. og “Bøtur” 394 t.kr.

Víddargjald er eitt árligt gjald, sum oljufeløgini gjalda fyri øki, tey hava fingið tillutað. Byrjanargjaldið er 500 kr. pr. ferkilometur pr. loyvisdag. Eftir 6 árum hækkar gjaldið árliga.

Bøtur eru gjøld fyri ólógliga parkering uttanfyri Tórshavnar, Klaksvíkar og Runavíkar kommunum, 45 t.kr., og fiskaríbøtur, 1.049 t.kr. Fiskaríbøtur eru landskassans helvt av teimum fiskaríbótum, ið verða skrivaðar út við Føroyar.

### 3.3.5 Endurrindan av keyps-MVG 20.52.5.

mió.kr.

| | Endurrindan av keyps-MVG 20.52.5. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Endurrindan av keyps-MVG | 150,0 | 142,8 | -7,2 |
| | **Tilsamans** | **150,0** | **142,8** | **-7,2** |

Henda høvuðskonta er til at miðsavna alt keyps-MVG.

### 3.3.6 Heildarveiting o.t. 20.54.1.

mió.kr.

| | Heildarveiting o.t. 20.54.1. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Heildarveiting | 615,5 | 615,5 | - |
| 02. | Endurgjøld | 19,5 | 20,8 | 1,3 |
| | **Tilsamans** | **635,0** | **636,3** | **1,3** |

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2005 umrøddu vit eitt endurgjald frá danska statinum viðvíkjandi sjúkrahúsverkinum. Hetta endurgjald var ikki komið við í roknskapirnar árini frammanundan, m.a. tí at samskiftistrupulleikar høvdu verið millum danskar og føroyskar myndugleikar um, hvagar endurgjaldsuppgerðin skuldi sendast. Talan var um mett endurgjald á 3 mió.kr. tíðarskeiðið 1. januar 1977 – 31. desember 2004.

Í juni 2009 kunnaði landsstýrismaðurin um, at føroyskir og danskir myndugleikar vóru komnir ásamt um endurgjaldskravið fram til 30. juni 2000, og eisini um, hvør danskur myndugleiki skuldi rinda.

Í juni 2010 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at enn er einki gjald komið frá Personalestyrelsen, men rykt verður aftur eftir gjaldinum nú. Avtalan millum partarnar var, at ikki fyrr enn kravið fram til 30. juni 2000 var fingið upp á pláss og goldið, skuldi verða farið undir at eftirrokna gjøldini fyri tíðina eftir 30. juni 2000.

### 3.3.7 Serinntøkur, fíggjarmál 53.21.7.

mió.kr.

| | | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 12. | Niðurlaðing av Trygdargrunninum | -30,0 | -30,0 | - |
| | **Tilsamans** | **-30,0** | **-30,0** | **-** |

Í fíggjarlógini er eingin játtan. Í eykajáttanarlógini apríl 2009 vórðu játtaðar 30 mió.kr. til útreiðslur.

Endamálið við játtanini var at fáa fíggjarliga heimild at flyta 30 mió.kr. úr "Trygdargrunninum fyri avreiðingar og lønir" í Vinnusjúkugrunnin, at nýta sum stovnsfæ sbr. Ll. nr. 67. frá 25 mai 2009 "um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða" og Ll. nr. 63 frá 25. mai 2009 "um broyting í løgtingslóg um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m."

### 3.3.8 Serinntøkur, vinnumál 56.21.1.

mió.kr.

| | | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 14. | Stovnsfæ til Vinnusjúkugrunnin | 30,0 | 30,0 | - |
| | **Tilsamans** | **30,0** | **30,0** | **-** |

Í fíggjarlógini er eingin játtan. Í eykajáttanarlógini apríl 2009 vórðu játtaðar 30 mió.kr.

Endamálið við játtanin var at fáa fíggjarliga heimild at flyta 30 mió.kr. úr "Trygdargrunninum fyri avreiðingar og lønir" í Vinnusjúkugrunnin, at nýta sum stovnsfæ sbr. Ll. nr. 67. frá 25 mai 2009 "um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða" og Ll. nr. 63 frá 25. mai 2009 "um broyting í løgtingslóg um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m."

## 3.4 Aðrar viðmerkingar

### 3.4.1 Ógreiða um játtanir til felags viðlíkahald

Landsgrannskoðanin hevur í undanfarnum frágreiðingum víst á ógreiðu um játtanir til felags viðlíkahald.

Víst hevur verið á, at hesar játtanir í ávísan mun verða brúktar til at keypa vørur, útbúnað og tænastur, ið vanliga ikki eru at rokna sum viðlíkahald ella tilfar í sambandi við viðlíkahald.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum helt í oktober 2006, at tørvur framvegis var á tílíkum felags játtanum. Landsstýrismaðurin var samdur í, at tað var ov tilvildarligt og ógreitt, hvat varð bókað sum felags viðlíkahald. Tað kundi talað fyri, at tørvur var á einari reglugerð, sum útgreinaði, hvat kundi verða skrásett sum viðlíkahald.

Í juni 2009 boðaði landsstýrismaðurin frá, at í sambandi við at lógin um landsins játtanarskipan var samtykt, fór at verða neyðugt til fíggjarlógina 2010 at gjøgnumganga allar høvuðskontur í fíggjarlógini. Tá er eyðsæð, at málið um játtanir til felags viðlíkahald verður tikið við í gjøgnumgongdini.

Í juni 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at stórar broytingar eru gjørdar, tí viðlíkahaldskonturnar eru strikaðar, og eru savnaðar á høvuðskontuni “Umvæling av almennum bygningum” undir Innlendismálum. Tað er Landsverk, sum umsitur játtanina. Fylgjast má tó við, hvussu henda skipan fer at roynast.

### 3.4.2 Fyrisitingarútreiðslur verða spjaddar

Landsgrannskoðanin hevur í frágreiðingum seinastu árini eisini umrøtt fyribrigdið, at fyrisitingarútreiðslur verða spjaddar. Landsgrannskoðanin hevur gjørt fleiri stovnar og aðalráð varugar við, at tað er ikki rætt at blanda umsitingar/fyrisitingarútreiðslur á einum stovni saman við øðrum játtanum, ið stovnurin ella aðalráðið umsitur.

Landsgrannskoðanin heldur ikki roknskapin vera nóg gjøgnumskygdan, tá ið stovnar ella aðalráð býta fyrisitingarútreiðslur út á aðrar játtanir, ið stovnurin/aðalráðið hevur ræði á. Henda mannagongd kann eisini vera við til at fjala hækkandi fyrisitingarútreiðslur.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum helt í oktober 2006 eisini, at fyrisitingarútreiðslur í mest møguligan mun áttu at verið savnaðar undir aðalráðunum. Fíggjarmálaráðið mælti til, at hesar høvuðskontur og aðrar vórðu gjøgnumgingnar fyri at fáa staðfest, í hvønn mun fyrisitingarútreiðslur vóru á hesum játtanum, og um hesar útreiðslur áttu at verið fluttar til avvarðandi aðalráð.

í juni 2009 boðaði landsstýrismaðurin frá, at í sambandi við at lógin um landsins játtanarskipan var samtykt, fór at verða neyðugt til fíggjarlógina 2010 at gjøgnumganga allar høvuðskontur í fíggjarlógini, og tá er eyðsæð, at málið um spjaddar fyrisitingarútreiðslur eisini verður tikið við í hesum arbeiði.

Í juni 2010 hevur landsstýrismaðurin ásannað, at enn er ikki nógv hent í hesum málinum. Uppleggið frá Fíggjarmálaráðnum er at gjøgnumganga málið um spjaddar fyrisitingarútreiðslur, men tað krevur fíggjarliga og umsitingarliga orku, so sum greitt er frá í viðmerkingunum til játtanarlógina, og tað er tað higartil ikki eydnast Fíggjarmálaráðnum at fáa.

### 3.4.3 Endurrindan av tænastumannaeftirlønum

Endurrindan frá danska statinum

Í 2009 endurrindaði danski staturin 20,8 mió.kr. fyri læraraeftirlønir. Talan er um tann partin av eftirlønini, sum tænastumenn hava vunnið sær rætt til, áðrenn teir "vórðu yvirtiknir". Hetta endurgjald verður tikið við í roknskapin undir § 20 "Inntøkur" undir málsøkinum "Heildarveiting o.t.", høvuðskonta 20.54.1.01.

Í øðrum førum verða endurgjøld fyri eftirlønir bókað á teimum kontum, har eftirlønin er útreiðsluførd, t.d. verða endurgjøld fyri eftirlønir til fyrrverandi starvsfólk undir Serforsorgini bókað sum negativ útreiðsla undir høvuðskontu "3.18.1.01. Tænastumanna-eftirlønir."

Seinasta ár reisti Landsgrannskoðanin spurningin, hví endurgjøldini fyri eftirlønarútreiðslur verða bókað ymiskt.

Í juni 2010 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Fíggjarmálaráðið fer at taka støðu til, um endurrindanin av tænastumannaeftirlønum skal verða flutt undir høvuðskonturnar, har útreiðslurnar av hesum tænastumannaeftirlønum verða hildnar, tað er serliga undir høvuðskontuni "Læraraeftirlønir" undir § 3 "Fíggjarmál".

## 3.5 Játtanarviðurskifti

### 3.5.1 Játtanarskipanin

Játtanarskipanin frá 1997 bygdi á tilmæli 5. mai 1995 frá einum arbeiðsbólki við umboðum úr táverandi Grannskoðanardeild Landskassans, Fíggjar- og Búskapardeildini í Landsstýrinum og Føroya Gjaldstovu. Á fundi 10. mai 1995 tóku landsstýrið og Fíggjarnevnd Løgtingsins undir við, at arbeiðið at broyta fíggjarlógarmannagongdina skuldi halda fram við støði í hesum tilmæli.

Arbeiðsbólkurin helt tá, at avgerandi treyt fyri at fáa skipanina at virka var, at ein umsitingarlig eind varð skipað undir Fíggjar- og Búskapardeildini við 3-4 royndum fólkum.

Henda eind skuldi burturav taka sær av at senda út og savna saman tilfar frá stovnum o.ø. til fíggjarlógar- og eykafíggjarlógaruppskot, edv-viðgera og kritiskt gjøgnumganga tilfarið, hava umsjón við, at reglurnar í budgetvegleiðingum o.t. vórðu hildnar, fyrireika og orða umsóknir um eykajáttanir til fíggjarnevndina, ráðgeva og vegleiða stovnar o.o. og greiða ivaspurningar í sambandi við, at farið verður yvir til nýggjar skipanir og reglur.

Fyritreytin helt ikki. Fíggjarmálaráðið hevði ikki fólkini, ið megnaðu at greiða og loysa ivamál um grundleggjandi fíggjarlógar- og roknskaparviðurskifti, m.a. tí at starvsfólka-útskiftingin var so stór.

Í frágreiðing latin løgtingsgrannskoðarunum í mars 2001 helt Landsgrannskoðanin støðuna vera óhepna, tí talan var um eitt øki, har Fíggjarmálaráðið átti at havt ein virknan, leiðandi og samskipandi leiklut.

### Vantandi dagføring av játtanarskipanini

Fíggjarmálaráðið arbeiddi síðani í fleiri ár við at dagføra játtanarskipanina og loysa ivamálini, uttan tó at koma á mál.

Í september 2004 helt Fíggjarmálaráðið, at semja var í landsumsitingini um eina nýggja játtanarskipan, ið eftir ætlan skuldi verða lýst sum rundskriv frá landsstýris-manninum í fíggjarmálum. Uppskotið til rundskriv varð sent Løgtingsins umsiting til viðmerkingar. Umsitingin boðaði frá, at hon kundi ikki taka undir við fleiri av ásetingunum í rundskrivinum, og hon var av tí áskoðan, at rættast var at gera eina játtanarlóg.

Í skrivi til Fíggjarnevndina í oktober 2004 segði Fíggjarmálaráðið seg einki hava ímóti, at ein játtanarlóg varð gjørd ístaðin fyri rundskriv. Tvørturímóti helt ráðið, at nógv hevði verið vunnið, um tað kundi gera, at semja varð millum landsumsitingina og løgtingsumsitingina um játtanarreglurnar.

### Uppskot um arbeiðsbólk

Í februar 2005 legði Fíggjarnevndin fram uppskot til samtyktar (Lm. nr. 38/2004) um, at formansskapur Løgtingsins skuldi seta ein serkønan arbeiðsbólk at fyrireika uppskot til eina játtanarlóg, ið skuldi áseta treytir og mannagongdir fyri játtanum.

### Álit um landsins játtanarskipan

24. februar 2006 lat arbeiðsbólkurin løgtingsformanninum álit. Arbeiðsbólkurin lýsti og viðgjørdi ivamál og trupulleikar við verandi játtanarskipan, og vísti á, hvussu trupulleikarnir kundu verða loystir við einari játtanarlóg.

Í álitinum lýsti arbeiðsbólkurin eisini játtanarskipanirnar í Danmark, Grønlandi, Íslandi, Noregi og Svøríki, umframt aðalreglurnar fyri ríkisfíggjarætlan og ríkisroknskapi í OECD-londum. Saman við álitinum læt arbeiðsbólkurin Formansskapinum eitt uppskot til játtanarlóg.

### Lógaruppskotið verður lagt fram

Formansskapurin legði lógaruppskotið fyri Løgtingið í mars 2006. Uppskotið varð beint í eina serliga § 25-nevnd. Uppskotið kom ikki úr aftur nevndini, áðrenn Løgtingið fór heim, og fall tí burtur.

## 3.5.2 Játtanarlógin

Formansskapurin legði aftur uppskotið "um landsins játtanarskipan" (játtanarlógina) fyri Løgtingið 6. mars 2009. Uppskotið varð samtykt 24. apríl 2009.

Lógin fekk gildi 5. mai 2009 og hevur við neyðugum frávikum virknað fyri fíggjarlógar-uppskotið 2010.

### Reglur sambært játtanarlógini

Í § 7 í lógini er ásett, at tá ið játtan verður nýtt, skulu neyðug búskaparlig atlit verða tikin.

Sambært § 25 í lógini <u>skal</u> landsstýrismaðurin, til tess at tryggja skynsama stuðuls-fyrisiting, áseta reglur um:

1. endamálið við stuðlinum,

2. móttakaraskara og útrokningargrundarlag,
3. útgjaldshátt og útgjaldstíð,
4. málsviðgerð,
5. viðtøkur fyri sjálvsognarstovnar,
6. eftirlit,
7. fíggjarætlan, roknskap og grannskoðan,
8. at geva ella taka aftur tilsøgn og at afturrinda stuðul,
9. upplýsingarskyldu og atgongd til kanning á staðnum og kanning av roknskapartilfari,
10. møguliga sekt við bót fyri at bróta reglurnar.

Sambært § 27 fær landsstýrismaðurin heimild at áseta neyvari reglur um:

1. uppsetan av og innihaldið í uppskoti til fíggjarlóg,
2. rakstrarjáttan, herímillum hvørjar inntøkur og útreiðslur, ið kunnu verða tiknar við,
3. fíggjarligan rakstur av landsfyritøkum,
4. fíggjarligan rakstur av inntøkufíggjaðum virksemi,
5. fíggjarligan rakstur av stuðulsfíggjaðum virksemi, og meginreglur fyri, nær hesar inntøkur verða skrásettar,
6. løgujáttan,
7. lógarbundna játtan,
8. stuðulsjáttan,
9. avmarkingar í flytingum millum standardkontur.

Sambært § 26 liggur tað á landsstýrismanninum í fíggjarmálum at síggja til, at hvør landsstýrismaður sær altíð heldur ásetingarnar í hesari lóg og reglum, gjørdar sambært lógini.

## Gerð av reglum

Í frágreiðing 10. februar 2010 til Fíggjarnevnd Løgtingsins kunnaði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum um, at arbeiðsbólkurin, ið gjørdi álitið og lógaruppskotið “um landsins játtanarskipan”, nú aftur hevði sett seg saman fyri at gera uppskot til tær reglur og vegleiðingar, ið vóru neyðugar fyri at játtanarlógin kundi virka eftir ætlan.

Arbeiðsbólkurin hevði sín fyrsta fund 8. februar 2010, og gjørdi av at gera uppskot til reglur um:

1. Kunngerð um uppseting og innihald í uppskoti til fíggjarlóg og um avmarkingar í flytingum millum standardkontur sbr. § 27, nr. 1 og 9, í játtanarlógini. Kunngerðin skal eisini hava reglur um tilgongdina fram til framløguna av fíggjarlógaruppskotinum, og reglur um innihaldið í búskaparfrágreiðing I og II.
2. Kunngerð um lógarbundar játtanir, stuðulsjáttanir og stuðulsfyrisiting sbr. §§ 25 og 27, nr. 7-8.
3. Kunngerð um rakstrarjáttan, herundir landsfyritøkur, inntøkufíggjað virksemi og stuðulsfíggjað virksemi sbr. § 27, nr. 2-5, og reglur viðvíkjandi avtalum við útreiðsluvirknað í seinni fíggjarárum jbr. § 17,
4. Kunngerð um løgujáttan sbr. § 27, nr. 6. Stuðulsjáttan til løguarbeiði verður fevnd av kunngerðini, ið er nevnd undir nr. 2.

5. Vegleiðing og eftirlitsskylduna hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum mótvegis hinum landsstýrismonnunum sbr. § 26, og § 7 um neyðug búskaparlig atlit.

Arbeiðsbólkurin væntaði at verða liðugur við arbeiði sítt á sumri 2010.

Sambært álitinum til lógaruppskotið "um landsins játtanarskipan" skuldi, umframt arbeiðið at orða kunngerðir, øll fíggjarlógin verða gjøgnumgingin viðvíkjandi m.a. uppseting, viðmerkingum, inntøkufíggjaðum virksemi, starvsfólkayvirlitum og virksemisyvirlitum.

Í frágreiðingini 10. februar 2010 nevndi landsstýrismaðurin harafturat, at játtanarlógin leggur eisini upp til varandi at styrkja fíggjarlógararbeiðið hjá Fíggjarmálaráðnum. Í framtíðini skulu tvær búskaparfrágreiðingar verða gjørdar, sum tilsamans fara at verða størri i vavi enn hon, sum higartil hevur verið gjørd.

Ein størri eftirlitsskylda verður løgd á Fíggjarmálaráðið sbr. § 26. Fíggjarmálaráðið skal í framtíðini geva loyvi til virksemi hjá landsfyritøkum, inntøkufíggjað virksemi og stuðulsfíggjað virksemi sbr. §§ 18 – 20.

Tað krevur eyka orku at seta í verk eina skipan við ætlanarárum. Í álitinum varð mett, at Fíggjarmálaráðið kundi megna uppgávurnar við einum eyka ársverki svarandi til 600 t.kr.

### Eykajáttan til gerð av reglum

Í eykajáttanarlógini mai 2010 varð skotið upp at játta Fíggjarmálaráðnum 500 t.kr. til at seta játtanarlógina í verk. Fíggjarnevndin mælti frá at veita eykajáttan, og setti fram broytingaruppskot samsvarandi. Broytingaruppskotið varð samtykt.

Vegna vantandi játtan er arbeiðið í arbeiðsbólkinum at seta játtanarlógina í verk fyribils steðgað.

### Viðmerkingar frá Landsgrannskoðanini

Í eykajáttanarlógini apríl 2006 varð játtanin til Fíggjarmálaráðið hækkað 500 t.kr. til at gera kunngerðir o.a. í sambandi við játtanarlógina. Lógaruppskotið um játtanarlógina fall burtur, sum greitt frá frammanfyri.

Tí kann tað ikki koma óvart á Fíggjarmálaráðið, at neyðugt var við peningi til at seta játtanarlógina í verk í 2010.

Landsgrannskoðanin undrast tí yvir, at landsstýrismaðurin ikki útvegaði sær neyðuga peningin, tá íð fíggjarlógaruppskotið fyri 2010 varð samtykt.

Landsgrannskoðanin harmast um, at arbeiðið at áseta reglur sambært játtanarlógini er steðgað. Vandi er fyri, at aðalráð og stovnar o.o. ikki eru nóg væl kunnað um, hvørjar reglur eru galdandi.

Landsgrannskoðanin vónar, at hetta arbeiðið fær ikki somu lagnu, sum vantandi dagføringin av játtanarskipanini á sinni, tí Fíggjarmálaráðið hevur ikki resursur, ið megna at greiða og loysa ivamál um grundleggjandi fíggjarlógar- og játtanarviðurskifti.

### Viðmerkingar frá landsstýrismanninum

Í juni 2010 harmast landsstýrismaðurin eisini um, at tað ikki eydnaðist honum at útvega pening á fíggjarlógini fyri 2010 til arbeiðið at seta játtanarlógina í verk.

Landsstýrismaðurin kunnar um, at hann fer at royna at útvega játtan í einum komandi eykajáttanarlógaruppskoti.

# 4 FISKIVINNUMÁL

## 4.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Veðurtænastan (rakstrarjáttan) | 2.900 | 3.156 | 256 |
| Havstovan (rakstrarjáttan) | 11.518 | 11.709 | 191 |
| Útlán (stuðulsjáttan) | -2.500 | -2.072 | 428 |
| Trygdarmiðstøðin (rakstrarjáttan) | 2.640 | 2.974 | 334 |

### 4.1.1 Veðurtænastan (rakstrarjáttan) 5.31.1.07.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2.900 t.kr. Meirnýtslan er 256 t.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 3.750 t.kr. til útreiðslur og 7.500 t.kr. til inntøkur. Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina 2009:

> *"verður málsøkið Veðurtænasta yvirtikið 1. apríl 2009. Sambært DMI er árligi kostnaðurin av at reka Veðurstøðina um 3,8 mió.kr. Harumframt koma aðrar útreiðslur, sum landsstýrið skal gjalda fyri tænastur frá DMI.*
>
> *Gjørt verður vart við, at játtanin í 2009 á 3,75 mió.kr. er givin við skeivum fortekni, sum ein nettoinntøka."*

Í eykajáttanarlógini apríl 2009 varð inntøkujáttanin 7.500 t.kr. strikað. Í eykajáttanar-lógini september 2009 varð játtanin lækkað 850 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum var økið júst yvirtikið og Fiskimálaráðið hevði ikki á heysti í 2009 nøktandi innlit í komandi útreiðslurnar. Leysligt samskifti var millum Fiskimálaráðið og Fíggjarmálaráðið um møguligt avlop á kontu fyri veðurtænastuna við tí úrsliti, at 850 t.kr. vórðu strikaðar av játtanini.

### 4.1.2 Havstovan (rakstrarjáttan) 5.34.3.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 11.518 t.kr. Meirnýtslan er 191 t.kr.

Talan er um eina játtan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 10.288 | 10.162 | -126 |
| 22. Ferðing og atburður hjá toski | 500 | 538 | 38 |
| 23. Fuglakanningarstøð | 524 | 668 | 144 |
| 24. Varðveitan av fjølbroyttum flota | 206 | 340 | 134 |
| 40. Inntøkufíggjað virksemi | - | 1 | 1 |
| **Tilsamans** | **11.518** | **11.709** | **191** |

Sambært landsstýrismanninum er meirnýtslan, at Havstovan hevur avskrivað gamlar verkætlanir.

### 4.1.3 Útlán (stuðulsjáttan) 5.34.5.01.

Í fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 9.000 t.kr. og ein útreiðslujáttan 6.500 t.kr. Sambært landsroknskapinum eru inntøkurnar 5.914 t.kr. og útreiðslurnar 3.842 t.kr.

t.kr.

| Lán, effektiv veðhald o.t. 5.34.5.01. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Útlán, inntøkur | -9.000 | -5.914 | 3.086 |
| 01. Útlán, útreiðslur | 6.500 | 3.842 | -2.658 |
| **Tilsamans** | **-2.500** | **-2.072** | **428** |

Talan er um afturgjøld og eftirgeving av lánum, ið eru veitt fiskivinnuni við heimild í Ll. nr. 102/1988 "um endurnýgging av fiskiskipaflotanum" v.s.b.

### 4.1.4 Trygdarmiðstøðin (rakstrarjáttan) 5.35.1.03.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2.640 t.kr. Meirnýtslan er 334 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum vóru fleiri orsøkir til meirnýtsluna:

- 225 t.kr. í minniinntøku, tí í 2009 vóru 150 nemingar færri enn í 2008,
- 168 t.kr. tí ein plattur við útgerð, sum ikki varð tryggjað, varð burtur á leiðini frá Noregi til Føroyar,
- 101 t.kr. til at gera ein nýggjan david. Fundamentið var *"av ymsum orsøkum"* dýrarari enn mett varð frammanundan.

## 4.2 Minninýtsla/frávik

### 4.2.1 Almenn jørð, søla (løgujáttan) 5.33.2.11.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 0 kr. netto, 10 mió.kr. til útreiðslur og 10 mió.kr. til inntøkur. Sambært landsroknskapinum 2009 eru útreiðslurnar 9,1 mió.kr. og inntøkurnar 9,1 mió.kr.

Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 10 mió.kr. til útreiðslur og 25 mió.kr. til inntøkur. Í eykajáttanarlógini apríl 2009 varð inntøkujáttanin lækkað 15 mió.kr.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er ætlanin at fáa meira fyri almenna jørð. Lógarbroytingar skuldu verða gjørdar fyri at røkka málinum at fáa 15 mió.kr. meira í landskassan av søluni.

Í viðmerkingunum til eykajáttanarlógina verður greitt frá, at "*hóast lógarverkið verður broytt í skundi verður ikki mett, at tað verður møguligt at fáa 15 mió.kr. í meirinntøkum av at selja landsjørð. Biðið verður um, at nettojáttanin, sum áður, verður útreiðsluneutral. Tá lóga-verkið kring um sølu av landsjørð er broytt, verður møguligt at gera eina meting av, hvussu stórar inntøkur landskassin kann fáa av søluni av landsjørð.*"

Í viðmerkingunum til fíggjarlógina er greitt frá um heimildirnar. Sambært Ll. nr. 45 frá 15. mai 2007 "um landsjørð" við seinni broytingum, er heimilað at selja burtur av landsjørð til almenn endamál, so sum grundstykkir til húsabygging og til handils-, ídnaðar-, havbúnaðar-, ítróttar- og frítíðarendamál o.a.

Eftir § 5 í Ll. nr. 21 frá 17. mai 2004 "um Búnaðargrunn" skal ágóðin frá søluni verða fluttur Búnaðargrunninum, og verða bókaður á kontu hjá avvarðandi festi. Talan er um eina fyri landskassan útreiðsluneutrala játtan.

### 4.2.2 Inntøkutrygd hjá fiskimonnum (lógarbundin játtan) 5.34.4.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 42 mió.kr. Minninýtslan er 6,2 mió.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 24 mió.kr. Í eykajáttanarlógini september 2009 varð játtanin hækkað 18 mió.kr.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina skuldu tillagingar verða gjørdar í skipanini fyri at halda játtanina á 24 mió.kr.

Í viðmerkingunum til eykajáttanarlógina verður greitt soleiðis frá:

> *"Nýggjasta metingin hjá Fiskimálaráðnum vísir, at útreiðslurnar til inntøkutrygd kunnu fara at tátta í 42 mió.kr. í 2009, um eingin lógarbroyting verður framd. Hetta er 18 mió.kr. meira enn upprunaliga játtanin.*
>
> *Fiskimálaráðið gjørdi eina meting av útreiðslunum til inntøkutrygd í februar 2009, og vísti tann metingin, at samlaðu útreiðslurnar fóru at liggja um 30 mió.kr. Orsakað av, at so stutt tíðarskeið var farið av 2009, var stór óvissa um, hvussu endaligu útreiðslurnar til inntøkutrygd fóru at verða í 2009. Seinni var ábendingin greiðari, og sendi Fiskimálaráðið umbøn til Fíggjarmálaráðið í mai 2009, har biðið varð um 16 mió.kr. í eykajáttan, men var hetta ov seint til at verða tikið við í uppskoti til eykajáttanarløgtingslóg fyri apríl 2009."*

# 5 VINNUMÁL

## 5.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| P/f Fiskaaling (stuðulsjáttan) | 7.000 | 7.541 | 541 |
| Umbygging av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni (løgujáttan) | 6.000 | 6.236 | 236 |
| Lánsafturgjald (stuðulsjáttan) | -2.500 | -86 | 2.414 |
| Postverk Føroya, eftirlønir (lógarbundin játtan) | 5.100 | 5.791 | 691 |
| Barsilsskipanin (lógarbundin játtan) | 86.400 | 90.893 | 4.493 |
| Umsiting av barsilsskipanini (rakstrarjáttan) | 1.586 | 1.696 | 110 |

### 5.1.1 P/f Fiskaaling (stuðulsjáttan) 6.36.1.05.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 7.000 t.kr. Meirnýtslan er 541 t.kr.

Á høvuðskontu 6.36.1.13. “Avtøka av endurgjaldsgrunni alivinnunnar” er ein javnstór upphædd sum inntøka.

Í fíggjarlógini var upprunaliga eingin játtan. Í eykajáttanarlógini apríl 2009 vórðu 7.000 t.kr. játtaðar.

Endamálið við játtanini var at fáa fíggjarliga heimild at hækka partapeningin í P/f Fiskaaling við fæi, sum var í Endurgjaldsgrunni Alivinnunnar, í sambandi við at hesin grunnur skuldi verða tikin av.

Sambært landsstýrismanninum varð mett, at fæið í Endurgjaldsgrunni Alivinnunnar var um 7 mió.kr. Tá fæið varð endaliga gjørt upp vísti tað seg, at hædd var ikki tikin fyri rentuinntøkum seinna hálvár 2009. Fæið varð tí 541 t.kr. størri, enn roknað var við.

### 5.1.2 Umbygging av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni (løgujáttan) 6.37.5.05.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 6.000 t.kr. Meirnýtslan er 236 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum eru 130 t.kr. goldnar ov nógv til byggiráðgeva. Meirnýtslan er tí 106 t.kr. Landsstýrismaðurin vísir á, at meirnýtslan má haldast at liggja innanfyri teir karmar, sum kunnu væntast, tá talan er um størri umvælingar-arbeiði.

Árini 2005 – 2009 vórðu játtaðar 28.900 t.kr. til umbygging av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Nýtslan var 28.629 t.kr.

### 5.1.3 Lánsafturgjald (stuðulsjáttan) 6.37.6.01.

Í fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 2.500 t.kr. Minniinntøkan er 2.414 t.kr.

Talan er um afturgjaldan av lánum, sum Íløgugrunnurin, Grunnur Ferðavinnunnar og Grunnurin til ídnaðarfremjandi endamál í sínari tíð hava latið. Føroya Gjaldstova umsitur játtanina.

Landsstýrismaðurin ger vart við, at tað er TAKS, sum umsitur innkrevjingina av falnu skuldini, meðan Gjaldstovan tekur sær av m.a. at bóka inngjøld og rentutilskrivingar.

Sambært TAKS hava krøvini verið fyri í Fútarættinum í 2006/2007, har skuldararnir søgdu seg vera insolventar. TAKS ger tí einki fyri at krevja inn falnu skuldina, tí tað tænir ongum endamáli, tá skuldararnir eru insolventir.

Vinnumálaráðið hevur fyrr í ár kannað, um nakað felag, sum hevur fingið lán, og sum stendur at skylda pening, er strikað. Eitt felag var strikað (tvingsilsavtikið), og er skuldin hjá hesum felag strikað/avskrivað í februar 2010.

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2011 er inntøkan sett til 0 kr, av tí at tað er sera óvist, um nakað lánsafturgjald verður.

### 5.1.4 Postverk Føroya, eftirlønir (lógarbundin játtan) 6.38.3.08.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 5.100 t.kr. Meirnýtslan er 691 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum blivu útreiðslurnar til eftirlønir av fleiri orsøkum hægri enn mett var.

- 325 t.kr. tí tvey starvsfólk, sum P/f Postverk Føroya ikki visti fóru frá við eftirløn,
- 175 t.kr. til trý fráfarin starvsfólk, sum fáa eftirlønina goldna út í Danmark. Av misgáum vóru hesar útreiðslur ikki tiknar við í fíggjarlógaruppskotinum,
- 150 t.kr. til nøkur starvsfólk, har eftirlønarútrokningarnar vóru skeivt mettar,
- 40 t.kr. vegna hækking í sáttmálanum hjá Tænastumannafelagnum í oktober 2009 (eftirlønin hjá tænastumonnum verður javnað við sama prosentsatsi, sum lønirnar).

### 5.1.5 Barsilsskipanin (lógarbundin játtan) 6.39.4.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 86,4 mió.kr. Meirnýtslan er 4,5 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum metti ALS, sum umsitur Barsilsskipanina, at útreiðslurnar fóru at verða um 86,4 mió.kr. Fleiri óvissur vóru tó í hesari meting:

- Broyting (frá 1. juni 2008) í útgjaldstíðarskeiðnum fyri bæði mammur og pápar,
- Talið á føddum børnum,
- Talið á umsóknum,
- Tíðarfreistin fyri at søkja (søkjast skal innan 6 mðr. eftir føðing).

Hetta eru óvissur, sum altíð eru, men tað serliga í 2009 er, at lógarbroytingin 1. juni 2008 longdi útgjaldstíðarskeiðið, umframt at pápar fingu betri møguleikar at taka ein part av barnsburðarfarloyvinum. Avleiðingin av hesari lógarbroyting hevur helst ikki víst seg í fullari megi enn, men hevur týðiliga ávirkað útreiðslurnar hjá skipanini í 2009.

Tað var/er ógjørligt at siga frammanundan, hvussu nógvir pápar fara at taka av hesum møguleika, og tí má ein meting verða gjørd. Pápar hava í miðal væl hægri inntøku enn mammur, og taka pápar í størri mun av tilboðnum, økir tað sjálvsagt kostnaðin av Barsilsskipanini.

Tað sum ger metingina serliga trupla er, at seinasta freist at søkja um barsilspening fyri 2009 er í juni 2010 - tað er fyri børn, sum eru fødd í desember 2009.

### 5.1.6 Umsiting av barsilsskipanini (rakstrarjáttan) 6.39.4.04.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1.586 t.kr. Meirnýtslan er 110 t.kr.

Landsstýrismaðurin vísir á, at sambært avtalu við ALS-stýrið skal ALS umsita Barsilsskipanina. Eftir avtaluni skal ALS hvønn mánað senda Vinnumálaráðnum rokning fyri arbeiðið.

Kostnaðurin at umsita kærunevndina hjá Barsilsskipanini, umframt samsýning til nevndina, fer eisini av hesari játtan.

Sambært landsstýrismanninum hevur umsitingin hjá Barsilsskipanini greitt frá, at játtanin til umsiting er ov lág. Tekniska umsitingin av Barsilsskipanini, sum liggur hjá P/f Elektron, er kompliserað, og tí eisini kostnaðarmikil í rakstri.

Eftir lógarbroytingina í 2008 er málsviðgerðin nógv økt. Fyri hvørja føðing skal hvør umsókn nú verða viðgjørd fleiri ferðir, av tí at arbeiðsgevarin rindar fyrstu 24 vikurnar av farloyvinum hjá mammuni (arbeiðsgevarin fær tó endurgjald frá Barsilsskipanini). Barsilsskipanin rindar frá viku 24 til viku 30. Reglurnar fyri páparnar eru eisini broyttar. Pápar kunnu nú taka ein part av farloyvinum umframt tær 2 vikurnar, sum teir høvdu rætt til undan broytingini.

Mammur, pápar og arbeiðsgevarar skulu søkja um barsilspening á serligum umsóknarblaði. Lógarbroytingin, sum hevur betrað munandi um umstøðurnar hjá mammum og pápum, hevur havt við sær økta arbeiðsbyrðu hjá umsitingini, av tí at nógv fleiri umsóknir eru fyri hvørja føðing. Økta arbeiðsbyrðan hevur havt við sær, at kostnaðurin av skipanini er farin út um játtanina.

Vinnumálaráðið hevur havt fleiri fundir við Stýrið hjá ALS viðvíkjandi nýtsluni í 2009. Avtalað er, at ALS skal fylgja neyvt við nýtsluni soleiðis, at tað ikki endurtekur seg, at nýtslan verður hægri enn játtanin. Avtalað er eisini, at sáttmálin verður endurskoðaður fyri 2011.

## 5.2 Minninýtsla/frávik

### 5.2.1 Jarðfeingi (rakstrarjáttan) 6.32.1.03.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 17.203 t.kr. Minninýtslan er 1.482 t.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 17.403 t.kr. Í eykajáttanarlógini september 2009 varð játtanin lækkað 200 t.kr. vísandi til, at væntandi fór ikki øll játtanin til undirkontu 21: "Landgrunsverkætlanin" at verða nýtt.

Talan er um eina játtan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 12.203 | 12.195 | -8 |
| 21. Landgrunsverkætlan | 5.000 | 3.526 | -1.474 |
| **Tilsamans** | **17.203** | **15.721** | **-1.482** |

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at Danmark, Føroyar og Grønland í 2003 fóru undir at fáa til vega neyðugar próvgrundir fyri at gera møgulig landgrunskrøv galdandi uttan fyri 200 fjórðinga markið. Í 2004 staðfestu Danmark, Føroyar og Grønland ST-havrættarsáttmálan frá 1982. Landskassin fíggjar helvtina av útreiðslunum, sum hava við føroysku landgrunskrøvini at gera. Danska stjórnin fíggjar hina helvtina. Í 2009 bleiv seinasta hond løgd á landgrunskravið, hvat innsavnan av tilfari viðvíkur.

Sambært landsstýrismanninum blivu útreiðslurnar lægri enn mett var, bæði til jarðfrøðiligar kanningar og til lønir og keyp av serfrøðingahjálp í sambandi við fyrireiking av skjølum og framløgu av formliga landgrunskravinum fyri landgrunsnevndina hjá ST í New York.

### 5.2.2 Avtøka av endurgjaldsgrunni alivinnunnar (stuðulsjáttan) 6.36.1.13.

Í fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 7.000 t.kr. Meirinntøkan er 541 t.kr.

Á høvuðskontu 6.36.1.05. "P/f Fiskaaling" er ein javnstór upphædd sum útreiðsla.

Í fíggjarlógini var upprunaliga eingin játtan. Í eykajáttanarlógini apríl 2009 vórðu 7.000 t.kr. játtaðar.

Endamálið við játtanini var at fáa fíggjarliga heimild at taka av grunnin, og at seta fæið í P/f Fiskaaling.

Sum greitt frá, undir høvuðskontu 6.36.1.05: P/f Fiskaaling (stuðulsjáttan), varð mett, at fæið var um 7 mió.kr. Tá endaliga varð gjørt upp vísti tað seg, at hædd var ikki tikin fyri rentuinntøkum seinna hálvár 2009. Fæið var tí 541 t.kr. størri, enn roknað var við.

### 5.2.3 Skráseting Føroya (rakstrarjáttan) 6.37.1.18.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1.997 t.kr. netto  Minninýtslan er 1.452 t.kr. netto.

Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 1.197 t.kr. netto. Í eykajáttanarlógini september 2009 varð játtanin hækkað 800 t.kr. netto.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina verður roknað við einari ógvuliga stórari hækking í útreiðslunum í 2009 í sambandi við tvingsilsavtøku av feløgum.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 800 | -703 | -1.503 |
| 21. FAS | 1.197 | 1.184 | -13 |
| 21. Aliloyvi | - | 64 | 64 |
| **Tilsamans** | **1.997** | **545** | **-1.452** |

Undirkonta 20: Skráseting Føroya

Sambært landsstýrismanninum vóru útlitini fyrst í 2009 sera vánalig til at fáa tær inntøkur, sum vóru neyðugar fyri at fíggja umsitingina av Skráseting Føroya.

Við tí grundgeving blivu ymisk gjøld fyri tænastur hjá Skráseting Føroya hækkað. Tað vísti seg tó, at virksemið minkaði ikki so nógv, og tí blivu inntøkurnar hægri, enn mett var.

Stovnurin fekk eina eykajáttan á 800 t.kr. til at rinda fyri kostnaðin av tvingsilsavtøkum, sum er lógarbundin útreiðsla. Hædd var ikki tikin fyri hesum útreiðslum, tá uppskotið til fíggjarlóg fyri 2009 bleiv gjørt. Tað var eisini fyrsta árið, at landskassin skuldi rinda fyri hesar útreiðslur, og var tað tí, at vinnufelagalóggávan var yvirtikin.

Upphæddin bleiv mett út frá, hvussu nógv feløg stovnurin hevði sent skiftirættinum til tvingsilsavtøku. Grundað á viðgerðartíðina í skiftirættinum blivu ikki øll feløgini endaliga tikin av í 2009.

Undirkonta 21: FAS

Sambært landsstýrismanninum varð av álvara samtykt at satsa upp á FAS seint í 2008. Lógin bleiv broytt fyri at gera skipanina meira smidliga, og 1.197 t.kr. blivu játtaðar í 2009 til at umsita skipanina.

Sambært landsstýrismanninum hevur satsingin eydnast væl, og 11 útlendsk skip eru skrásett í FAS í 2009.

Undirkonta 21: Aliloyvi

Í 2009 bleiv ein nýggj umsiting av aliloyvum skipað. Umsitingin skuldi verða fíggjað við inngjøldum frá loyvishavarunum, við árligum gjaldi á øll aliloyvi. Tað eru stovningarútreiðslurnar, sum hava havt við sær meirnýtsluna, og hesar útreiðslur koma bara fyri eina ferð.

### 5.2.4 Strandfaraskip Landsins (løgujáttan) 6.38.2.02.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 6.550 t.kr. Minninýtslan er 2.193 t.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 3.500 t.kr. Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina skal játtanin nýtast til at fáa til vega eitt hóskandi skip til Fugloyar/Svínoyarfarleiðina.

Í eykajáttanarlógini apríl 2009 varð játtanin hækkað 1.850 t.kr. til at keypa ein bingjubil og ein síðulyftara, sum sleppa ígjøgnum Hvalbiartunnilin.

Í eykajáttanarlógini september 2009 varð játtanin hækkað 1.200 t.kr. til at umvæla “Ternuna” til Nólsoyarleiðina.

Talan er um eina játtan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 16. Nólsoyarskip | 3.800 | 2.052 | -1.748 |
| 17. Nýtt skip til Fugloyarleiðina | 900 | 455 | -445 |
| 18. Flutningsakfar til Hvalbiartunnilin | 1.850 | 1.850 | - |
| **Tilsamans** | **6.550** | **4.357** | **-2.193** |

Í eykajáttanarlógini september 2009 er C.- átekning soleiðis orðað:

“Landsstýrismanninum verður heimilað at gera sáttmála um umvæling av M/S Ternuni og M/S Rituni fyri 9,4 mió.kr.”

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at hóast C.- átekningina kravdi Fíggjarnevndin, at ein verklagslóg bleiv gjørd, soleiðis at tað bæði var materiell og fíggjarlig heimild.

18. desember 2009 samtykti Løgtingið uppskot til løgtingslóg “um umvæling av MF Ternuni og MF Rituni” (Lm. nr. 80/2009). Sambært lógini *“verður heimilað Landsstýrismanninum at gera avtalur um neyðuga umvæling av MF Ternuni og MF Rituni. Umvælingarkostnaðurin fyri báðar ferjurnar kann í mesta lagi vera 9,4 mió.kr.”*

Sambært landsstýrismanninum er sáttmáli gjørdur við:

- P/f Mest í Tórshavn um at umbyggja og umvæla Ternuna, undirskrivaður 27.01.10,
- Vágs Skipasmiðju og Bærentsen Teknik um at umbyggja og umvæla Rituna, undirskrivaður 27.01.10, og
- Kone Elevators um at veita og uppseta lyftu í Ternuna, undirskrivaður 29.12.09.

Landsgrannskoðanin skal viðmerkja, at sambært § 12 í Ll. nr. 42 frá 4. mai 2009 “um landsins játtanarskipan *”kann við átekning heimild verða givin at gera avtalur, sum hava við sær útreiðslur í fylgjandi fíggjarárum, og gjørdar kunnu verða ítøkiligar lógarásetingar viðvíkjandi játtanum.”*

Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið er ein C.- átekning at meta sum materiell lóggáva á fíggjarlógini, tí var helst ikki neyðugt við einari verklagslóg.

# 6 MENTAMÁL

## 6.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Próvtøkur (rakstrarjáttan) | 7.608 | 7.816 | 208 |
| Gjald fyri lærusáttmálar o.a. (stuðulsjáttan) | -1.020 | -528 | 492 |
| Studentaskúlin í Hoydølum (løgujáttan) | 5.500 | 5.864 | 364 |
| Lestrarstuðul (lógarbundin játtan) | 92.391 | 92.843 | 452 |
| Leiklist (rakstrarjáttan) | 5.058 | 5.189 | 131 |
| Kringvarp Føroya (landsfyritøka) | - | 725 | 725 |
| Lánsafturgjald (stuðulsjáttan) | -100 | - | 100 |

### 6.1.1 Próvtøkur (rakstrarjáttan) 7.23.1.31.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 7.608 t.kr. netto. Meirnýtslan er 208 t.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 6.608 t.kr. Í eykajáttanarlógini apríl 2009 varð játtanin hækkað 1.000 t.kr.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina hevur verið vanligt í Føroyum at nýta somu próvtøku-uppgávusett til student-, HF-, HT- og HH-útbúgvingarnar, sum hava verið nýtt til somu útbúgvingar í Danmark. Hesar útbúgvingar eru broyttar í Danmark, soleiðis at ikki ber til longur at brúka øll tey donsku uppgávusettini í Føroyum. Tí verður neyðugt at gera nýggj uppgávusett til føroysku próvtøkurnar. Mett verður, at tað kemur at kosta um 1.000 t.kr. at gera hesi uppgávusettini, íroknað sett til sjúkraroyndir og til sjálvlesandi.

Sambært landsstýrismanninum stendst meirnýtslan serliga av, at í 2009 vóru fleiri sjálvlesandi bæði í fólkaskúlanum og á miðnámsútbúgvingunum. Fyri sjálvlesandi á fólkaskúlaøkinum rindar próvtøkujáttanin fyri vegleiðing, próvdøming og samsýning. Á miðnámsskúlaøkinum verður rindað fyri próvdøming. Eisini próvdømingin á Vinnuháskúlanum gjørdist dýrari, enn mett var av fyrstan tíð.

### 6.1.2 Gjald fyri lærusáttmálar o.a. (stuðulsjáttan) 7.23.3.15.

Í fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 1.020 kr. Minniinntøkan er 492 t.kr. Sambært landsstýrismanninum vóru færri lærusáttmálar gjørdir í fíggjarárinum 2009, enn mett var.

### 6.1.3 Studentaskúlin í Hoydølum (løgujáttan) 7.23.3.28.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 5.500 t.kr. Meirnýtslan er 364 t.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 4.000 t.kr. Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er játtanin ætlað til løgur í sambandi við krøv frá Brunaumsjón Landsins og Arbeiðseftirlitinum

Í eykajáttanarlógini apríl 2009 varð játtanin hækkað 1.500 t.kr. Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina hevði Landsverk gjørt eina ætlan fyri, hvussu trupulleikarnir við leka, vánaligari inniluft og soppavøkstri í skúlanum kundu verða loystir í summarfrítíðini 2009. Henda umvæling fór at kosta um 1,5 mió.kr. meira, enn játtað var á fíggjarlógini 2009.

Arbeiðið at umvæla høvuðsbygningin vísti seg, sambært landsstýrismanninum, at verða truplari og at kosta meira, enn roknað var við. Til tess at fylgja krøvunum hjá Arbeiðseftirlitinum kundi arbeiðið ikki stegða upp, og neyðugt var at gera arbeiðið liðugt í 2009.

Í brotinum um Innlendismál er greitt frá, at á høvuðskontu 15.11.1.56. "Umvæling av almennum bygningum" eru 803 t.kr. nýttar at umvæla høvuðsbygningin í Hoydølum.

### 6.1.4 Lestrarstuðul (lógarbundin játtan) 7.23.7.04.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 92,4 mió.kr. netto. Meirnýtslan er 0,5 mió.kr. netto. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 89,9 mió.kr. netto. Í eykajáttanarlógini apríl 2009 varð játtanin lækkað 2,5 mió.kr. netto.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina skuldi lógarbroyting verða framd, so lestrastuðulin til teirra, sum búgva heima, skuldi lækkað, og prístalsjavningin skuldi verða tikin av frá 1. august 2009 til 31. juli 2010.

Í eykajáttanarlógini september 2009 varð játtanin hækkað 5 mió.kr. netto. Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina eru høvuðsorsøkirnar:

- At fleiri lesandi vórðu tikin inn: 1,4 mió.kr.
- Broytingar í lánspartinum 3,6 mió.kr.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina hevði gongdin í 2009 víst munandi broytingar í lánspartinum, í mun til árini frammanundan, sum allar hálaðu netto-útreiðslurnar uppeftir:

1. Fleiri tóku lán.
2. Afturgjald av lánum minkaði.
3. Rentuinntøkurnar vóru lágar, tí diskontan var sera lág.

Játtanin til lestrarstuðul er ein nettojáttan við stuðulsveitingum og einum lánsparti:

t.kr.

| Lestrarstuðul 7.23.7.04. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Stuðul | 90.041 | 92.574 | 2.533 |
| Útlán | 12.600 | 10.547 | -2.053 |
| Avskrivingar o.a. | 250 | 66 | -184 |
| **Útreiðslur tilsamans** | **102.891** | **103.187** | **296** |
| Afturgjaldan av útlánum v.m. | -9.500 | -8.903 | 597 |
| Rentuinntøkur | -1.000 | -1.441 | -441 |
| **Inntøkur tilsamans** | **-10.500** | **-10.344** | **156** |
| **Nettoútreiðslur tilsamans** | **92.391** | **92.843** | **452** |

Landsstýrismaðurin hevur víst á, at útreiðslurnar tilsamans vóru 296 t.kr. hægri og inn-tøkurnar vóru 156 t. kr. lægri, enn mett var.

Lestrastuðulin til teirra, sum búgva heima, varð lækkaður, og prístalsjavningin varð tikin av 1. august 2009.

### 6.1.5 **Leiklist** (rakstrarjáttan) 7.24.2.06.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 5.058 t.kr. Meirnýtslan er 131 t.kr.

Talan er um eina játtan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Tjóðpallur Føroya | 3.858 | 3.989 | 131 |
| 21. Meginfelag áhugaleikara Føroya | 750 | 750 | - |
| 22. Stuðul til yrkisleiklist | 450 | 450 | - |
| **Tilsamans** | **5.058** | **5.189** | **131** |

Sambært landsstýrismanninum varð øll inntøkan av atgongumerkjum, sum vóru seld gjøgnum Kunningarstovuna í november 2009, ikki bókað í 2009, tí uppgerðin kom so seint, at roknskaparárið varð latið aftur.

Í framtíðini verður rokning send fyri seld atgongumerki, soleiðis at sølan verður tíðaravmarkað rætt.

### 6.1.6 **Kringvarp Føroya** (Landsfyritøka) 7.24.4.06.

Í fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 63.560 t.kr. og ein útreiðslujáttan 63.560 t.kr. Meirnýtslan er 725 t.kr. netto.

Sambært landsroknskapinum eru inntøkurnar 60.814 t.kr. og útreiðslurnar 61.539 t.kr.

t.kr.

| Kringvarp Føroya 7.24.4.06. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Inntøkur | -63.560 | -60.814 | 2.746 |
| Útreiðslur | 63.560 | 61.539 | -2.021 |
| **Tilsamans** | **-** | **725** | **725** |

Sambært landsstýrismanninum vórðu allar inntøkurnar (t.e. Kringvarpsgjald, spæli-inntøkur og lýsingarinntøkur) minni enn árið fyri, og hóast spart var á øllum økjum, eyðnaðist ikki at minka útreiðslurnar so mikið, at javnvág fekst millum útreiðslur og inntøkur.

### 6.1.7 **Lánsafturgjald** (stuðulsjáttan) 7.24.8.01.

Í fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 100 t.kr. Ongin inntøka er skrásett í landsroknskapinum.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er talan um lánsupphæddir, sum verða goldnar aftur frá kommunum og ítróttafeløgum í sambandi við lántøku til at byggja ítróttaanlegg.

Í seinastu frágreiðing greiddi Landsstýrismaðurin frá, at talan var um eitt lán til Tofta Ítróttafelag. Føroya Gjaldstova hevur boðað frá, at lánið er til innheintingar.

Sambært landsstýrismanninum er skylduga upphæddin ikki enn heintað inn. TAKS arbeiðir við málinum.

## 6.2 Minninýtsla/frávik

### 6.2.1 Eftirskúlar (løgujáttan) 7.23.2.10.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2.000 t.kr. Ongin peningur er brúktur. Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina var ætlanin at stuðla verksetan av eftirskúlum. Játtanin var treytað av, at stigtakarar eisini játtaðu sín part av kostnaðinum.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at verkætlanin kom ikki so langt í 2009, at nakað varð brúkt av játtanini.

### 6.2.2 Miðnámsútbúgvingar (rakstrarjáttan) 7.23.3.05.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 166,5 mió.kr. Minninýtslan er 1,5 mió.kr.

Talan er um eina játtan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy | 19.200 | 19.175 | -25 |
| 21. Føroya Studentaskúli og HF-skeið | 45.500 | 45.169 | -331 |
| 22. Klaksvíkar HF-skeið | 3.800 | 3.823 | 23 |
| 23. Miðnámsskúlin í Suðuroy | 10.000 | 10.427 | 427 |
| 24. Føroya Handilsskúli | 33.100 | 33.035 | -65 |
| 25. Tekniski skúli í Tórshavn | 30.411 | 30.491 | 80 |
| 26. Tekniski skúli í Klaksvík | 16.400 | 15.182 | -1.218 |
| 27. Fiskivinnuskúlin, vanligt virksemi | 5.100 | 5.098 | -2 |
| 28. Felags fyri miðnámsskúlar | 3.000 | 2.612 | -388 |
| **Tilsamans** | **166.511** | **165.012** | **-1.499** |

Sambært landsstýrismanninum stavar minninýtslan í høvuðsheitum frá Tekniska skúla í Klaksvík, sum hevði minni rakstrarútreiðslur, enn roknað var við, og hægri kommunustuðul, enn mett var.

### 6.2.3 Tekniski skúli í Klaksvík (løgujáttan) 7.23.3.07.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1.000 t.kr. Minninýtslan er 1.182 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er minninýtslan:

1. Ein avseting á 420 t.kr., har gjørt varð av bert at rinda 65 t.kr. Tískil eru 355 t.kr. inntøkuførdar í 2009.
2. Eitt byggivirki fekk í 2008 goldið 830 t.kr. ov nógv. Henda upphædd er goldin aftur í 2009.

Í brotinum um Innlendismál er greitt frá, at á høvuðskontu 15.37.4.10. "Orkunýtsla í almennum bygningum" eru nýttar 652 t.kr. til Tekniska skúli í Klaksvík.

### 6.2.4 Fiskivinnuskúlin (løgujáttan) 7.23.3.08.

Í fíggjarlógini 2009 er ongin játtan. Sambært landsroknskapinum er ein inntøka, 852 t.kr. Talan er um afturførda avseting.

Sambært landsstýrismanninum vórðu í 2008 1.952 mió.kr. settar av í sambandi við eina ósemju. Síðani er semja gjørd millum partarnar. Tilsamans 1.100 mió.kr. eru goldnar til ráðgeva og arbeiðstakara. Restin 852 t.kr. eru inntøkuførdar í 2009.

### 6.2.5 Studningur til læripláss (lógarbundin játtan) 7.23.3.14.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 15.010 t.kr. Minninýtslan er 394 t.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 16.010 t.kr. Í eykajáttanarlógini apríl 2009 varð játtanin lækkað 2.000 t.kr. vísandi til, at *"lærlingatilgongdin er lækkað nógv ta síðstu tíðina."*

Í eykajáttanarlógini desember 2009 varð játtanin hækkað 1.000 t.kr. Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina fór lærlingartalið væntandi at verða hægri, enn hildið varð av fyrstan tíð.

Sambært landsstýrismanninum komu serliga nógvar studningsuppgerðir inn á heysti 2009. Hildið var, at neyðugt var við eykajáttan, og tí varð biðið um 1 mió.kr. í eykajáttan, men tá ið árið 2009 var liðugt gjørt upp, vísti úrslitið eina minninýtslu.

### 6.2.6 Ítróttahøll á Sandoynni (løgujáttan) 7.24.6.13.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 5.500 t.kr. Minninýtslan er 3.111 t.kr. Í fíggjarlógini var upprunaliga eingin játtan. Í eykajáttanarlógini apríl 2009 vórðu játtaðar 5.500 t.kr.

Í viðmerkingunum til uppskotið til eykajáttanarlógina stendur:

> *"Samgongan hevur samtykt, at landið skal byggja eina ítróttahøll á Sandi, og hevur heitt á landsstýriskvinnuna í mentamálum um at fara undir at fyrireika hesa bygging. Áðrenn farast kann undir arbeiðið, skulu fyrireikingar gerast, og ein verklagslóg skal verða samtykt. Tí er ilt nú at meta um samlaða byggikostnaðin, og um hvussu stór upphædd skal verða umbiðin við eykajáttan. Biðið verður um, at 7 mió.kr, verða játtaðar til endamálið í 2009."*

Í álitinum frá meirilutanum í Fíggjarnevndini varð skotið upp at lækka játtanina til "Ítróttahøll í Sandoynni" til 5,5 mió.kr. við hesum viðmerkingum:

> *"Henda upphædd er nøktandi til, at MMR kann keypa fyriliggjandi projekt um ítróttahøll í Traðardali í Sandoynni frá kommununum í oynni, og at MMR bjóðar út arbeiðið at gera høllina eftir fyriliggjandi projekti."*

Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at farið varð undir fyrireikingararbeiðið fyrst í oktober 2009, tá ein bygginevnd varð sett at seta upp eina sokallaða byggiskrá, sum m.a. gjøllari skal lýsa, hvat høllin skal brúkast til.

Arbeiðið hjá nevndini var liðugt fyri jól, og fyrst í januar 2010 læt ein samd bygginevnd byggiskránna úr hondum. Nevndin er samd um, at við byggiskránni er fingið til vegar eitt haldgott grundarlag at gera prosjekteringina av høllini lidna. Ein mett upphædd, at keypa hetta prosjekt, er útreiðsluførd í landsroknskapinum 2009, og upphæddin er støðlað á fíggjarstøðuni, til málið er avgreitt.

22. apríl 2010 samtykti Løgtingið "Uppskot til løgtingslóg um at byggja ítróttahøll í Sandoynni" (Lm. nr. 83/2009), har byggikostnaðurin í mesta lagi kann vera 27 mió.kr.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at nú verklagslógin er samtykt, verður farið undir at gera prosjektið liðugt samsvarandi byggiskránni, og síðani verður arbeiðið boðið út.

### 6.2.7 **Kringvarpssendistøðir** (løgujáttan) 7.38.3.10.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1.000 t.kr. Ongin peningur er brúktur. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 4.000 t.kr. Í eykajáttanarlógini apríl 2009 varð játtanin lækkað 3.000 t.kr.

Í viðmerkingunum til fíggjarlógina verður Løgtingið kunnað um, at *"játtanin er avsett til at endurnýggja sjónvarpssendinetið. Verklagslóg um at byggja sjónvarpssendinetið verður gjørd".*

Í viðmerkingunum til eykajáttanarlógina verður Løgtingið kunnað um, at *"avgerð er ikki tikin enn um, hvussu sendinetið skal byggjast, og er eingin verklagslóg løgd fyri Løgtingið. Tí er ilt at meta um, hvussu nógv útbyggingin kemur at kosta í 2009."*

Í fíggjarlógini 2010 er ongin játtan.

Sambært landsstýrismanninum er støða ikki tikin til, hvussu sendinetið skal byggjast út.

# 7 HEILSUMÁL

## 7.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Kommunulæknaskipanin (rakstrarjáttan) | 11.422 | 11.907 | 485 |
| Apoteksverkið (rakstrarjáttan) | - | 3.988 | 3.988 |
| Landssjúkrahúsið, útbygging (løgujáttan) | 34.000 | 36.294 | 2.294 |
| Suðuroyar sjúkrahús (rakstrarjáttan) | 46.939 | 47.249 | 310 |
| Serviðgerð uttanlands (rakstrarjáttan) | 133.597 | 138.618 | 5.021 |
| Viðgerðarstovnurin Heilbrigdi (rakstrarjáttan) | 5.033 | 5.718 | 685 |

### 7.1.1 Kommunulæknaskipanin (rakstrarjáttan) 11.20.2.04.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 11.422 t.kr. Meirnýtslan er 485 t.kr. Sambært landsstýrismanninum eru um triðingurin av føstu kommunulæknastørvunum ósett. Hesi størv verða tí sett við skiftandi avloysarum. Sambært sáttmálanum skal Kommunulæknaskipanin rinda lønarútreiðslurnar til hjálparstarvsfólk, ið starvast í viðtalum har lækni ikki er í føstum starvi. Í viðtalum, har lækni er í føstum starvi, er tað læknin sjálvur, sum rindar fyri hjálparfólkið.

Lønarútreiðslurnar til hjálparstarvsfólk eru øktar munandi seinnu árini, av tí at færri kommunulæknar eru í føstum starvi. Hóast alt bendi á, at játtanin fór at halda í 2009, vísti tað seg, at sjúka og óvæntað fráferð úr føstum starvi seint í árinum førdi við sær eina meirnýtslu.

Landsstýrismaðurin kunnar um, at hann hevur tikið frágreiðingina frá Kommunulæknaskipanini um meirnýtsluna til eftirtektar. Landsstýrismaðurin heldur tað ikki vera nøktandi, at eingin upphædd er sett av til hesar útreiðslur, og hevur boðað frá, at tað verður gjørt í framtíðini.

### 7.1.2 Apoteksverkið (rakstrarjáttan) 11.20.2.08.

Í fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 189,5 mió.kr. og ein útreiðslujáttan 189,5 mió.kr. Meirnýtslan er 3.988 t.kr. netto.

Sambært landsroknskapinum eru inntøkurnar 201,0 mió.kr. og útreiðslurnar 205,0 mió.kr.

t.kr.

| Apoteksverkið 11.20.2.08. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Inntøkur | -189.542 | -200.973 | -11.431 |
| Útreiðslur | 189.542 | 204.961 | 15.419 |
| **Tilsamans** | **-** | **3.988** | **3.988** |

Sambært landsstýrismanninum hevur landsapotekarin kunnað hann um, at í høvuðsheitum er meirnýtslan útreiðslur til KT í sambandi við tillagingarnar til hagtøl og simuleringsskipanir til tær nógvu broytingarnar í tilskotinum frá Sjúkrakassunum, Almannastovuni og lutvíst Heilsutrygd.

Fyri ein stóran part eru hetta uppgávur, sum ikki vóru roknaðar við frammanundan, m.a.:

- Sjúkrakassatilskotið varð broytt frá at vera 75% og 50% til bert at vera 50%.
- Broytingar í heilivágskunngerðini gjørdu, at pensjónistar ikki longur fingu tilskot frá Sjúkrakassa og Almannastovuni til allan heilivág, og heldur ikki annað ('ikki-heilivágur'), sum varð sett á resept. Henda broyting varð framd í stigum, og kravdi tí eisini, at apoteksskipanin varð broytt í stigum.
- Ein heilt nýggj sjúkratrygd varð sett í verk, sum grundleggjandi var øðrvísi enn hon, sum var frammanundan. Hetta arbeiðið var fyri ein stóran part gjørt í 2009, og her varð gjørd ein umfatandi broyting í reseptavgreiðslupartinum.

Sambært landsstýrismanninum, hevur Landsapotekarin greitt frá, at grundarlagið undir teirra meting av útreiðslum til KT í 2009 vórðu gjørdar í juni mánaði í 2008. Tá var bert uppgradering av Axapta á skránni, tí verandi skipan var gomul. Uppgraderingin varð tá mett at kosta um 1,5 mió.kr. Aftaná ber til at staðfesta, at henda meting var ov bjartskygd.

Afturat tí komu krøv um broytingar í tilskotsskipanunum, sum tað hjá Apoteksverkinum var ógjørligt at vita frammanundan. Hesar broytingar komu so seint, at tað ikki var lagt upp fyri tí í nóg góðari tíð.

Allar broytingar í skipanunum skuldu mennast, testast og setast í verk, samstundis sum Apoteksverkið varð farið undir teirra planløgdu uppgradering av apoteksskipanini. Talan gjørdist sostatt um tríggjar størri KT-verkætlanir, har bert ein var løgd til rættis frammanundan.

Afturat broytingini í KT-skipanini varð 7. apríl 2009 biðið um eina prísbroyting, sum skuldi givið 2,67 mió.kr. meira árliga í inntøku. Hendan prísbroyting kom ikki í gildi fyrr enn 28. mai 2009, og hon kom tí ikki at muna við meira enn einari góðari helvt.

Harafturat kom lækkingin av prísinum á hjartaheilivági, ið aktivt varð sett í verk við tilskotsbroytingum, og sum varð mett at geva eina sparing – 2 til 3 mió.kr. – í tilskotsskipanunum. Við hesari broyting minkaði eisini umsetningurin og inntøkan hjá Apoteksverkinum.

Í 2009 hava avmarkingarnar í tilskotsskipanunum sum heild havt við sær lægri umsetning. Tá ið inntøkurnar eru treytaðar av umsetninginum, hevur tað havt við sær, at inntøkurnar hjá Apoteksverkinum hava verið lægri enn væntað.

Landsstýrismaðurin boðar frá, at hann hevur tikið frágreiðingina frá Landsapotekaranum til eftirtektar, men hann heldur tó ikki, at grundgevingarnar fyri meirnýtsluni eru nøktandi. Landsstýrismaðurin hevur átalað meirnýtsluna. Somuleiðis er boðað Apoteksverkinum frá, at ein tílík meirnýtsla í framtíðini væntandi fer at fáa avleiðingar.

Landsstýrismaðurin hevur ta áskoðan, at koma óvæntaðar útreiðslur í einum fíggjarári til KT-verkætlanir ella av øðrum orsøkum, so skulu hesar útreiðslur ikki aktiverast og setast í verk, uttan at landsstýrismaðurin er kunnaður um, hvørjar avleiðingar útreiðslurnar koma at hava á játtanina hjá stovninum. Er tað alneyðugt at fremja broytingar, ið hava útreiðslur við sær, so mugu inntøkur og útreiðslur hjá Apoteksverkinum tillagast soleiðis, at játtanin kemur at halda.

### 7.1.3 Landssjúkrahúsið, útbygging (løgujáttan) 11.20.3.08.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 34.000 t.kr. Meirnýtslan er 2.294 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er tað Landsverk, sum frá sjúkrahússtjóranum hevur fingið ábyrgdina at stýra samlaða byggivirkseminum á Landssjúkrahúsinum. Herundir fíggjarligu stýringina, sáttmálaviðurskifti, góðkenning av útreiðsluskjølum, bókingar o.a. Tað er stjórin á Landsverk, sum stendur sum stovnsleiðari í Búskaparskipan landsins. Landsverk arbeiðir innan fyri teir fíggjarkarmar, sum sjúkrahússtjórin hevur ásett, at játtanin skal brúkast til.

Sjúkrahússtjórin hevur greitt landsstýrismanninum frá, at hann heldur regluligar uppfylgingarfundir við Landsverk um fíggjarligu gongdina. Tað var ikki fyrr enn um mánaðarskifti november/desember, at Landsverk boðaði frá, at framleiðslan hjá arbeiðstakaranum TG-Verk gjørdist størri, enn metingin. TG-Verk arbeiddi fyri 20,7 mió.kr. í 2009 ella 2,7 mió.kr. meira, enn tey høvdu roknað við. Varð TG-Verk steðgað mitt í framleiðsluni, so hevði felagið kunnað sent Landsverki endurgjaldskrav fyri mista framleiðslu. Árið var so langt liðið, tá ið støðan kom í, at ikki var møguligt at finna sparingar á øðrum økjum.

Landsstýrismaðurin hevur tikið frágreiðingina til eftirtektar, men heldur ikki, at mannagongdirnar viðvíkjandi fíggjarligu stýringini av byggivirkseminum eru nøktandi, og hevur tí átalað meirnýtsluna. Somuleiðis er fráboðað sjúkrahússtjóranum, at ein tílík meirnýtsla í framtíðini væntandi fer at fáa avleiðingar, og er hann tí biðin um at taka neyðug stig fyri at tryggja, at tað ikki endurtekur seg.

Sambært Ll. nr. 129/2008 “um at høvuðsumvæla, útbyggja og nútíðargera Landssjúkrahúsið” kunnu útreiðslurnar í mesta lagi verða 150 mió.kr. árini 2009 – 2012.

Landsstýrismaðurin hevur boðað frá, at hann fer at fylgja neyvt við gongdini, so at hóast farið er út um játtanina í 2009, verður samlaði fíggjarkarmurin fyri verklagslógina hildin.

Í brotinum um Innlendismál er greitt frá, at á høvuðskontu 15.11.1.56. “Umvæling av almennum bygningum” eru nýttar góðar 3 mió.kr., og á høvuðskontu 15.37.4.27. “Orkunýtsla í almennum bygningum” eru nýttar 789 t.kr. til at høvuðsumvæla Landssjúkrahúsið.

<u>Útreiðslur til skeið og ráðstevnu</u>

Sambært Búskaparskipan Landsins eru um 213 t.kr. nýttar til skeið og ráðstevnu. Vit spurdu, hví hesar útreiðslur eru bókaðar á hesari høvuðskontu, sum er ein løgujáttan, og hvørji starvsfólk tóku lut.

Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at hann hevur fingið at vita, at *“talan var um eina kunningarferð hjá Bygginevndini hjá Landssjúkrahúsinum saman við ráðgevum. Mett varð, at hetta var ein týðandi kunningarferð at luttaka á, við atliti til ta uppgávu, sum bygginevndin sat við í mun til planlegging av útbyggingini av Landssjúkrahúsinum. Innihaldið í ferðini var av tílíkum slag, at útreiðslurnar skuldu fara av nevndu høvuðskontu.”*

Luttakararnir vóru 5 fólk frá Landssjúkrahúsinum, 2 fólk frá Heilsumálaráðnum, 2 fólk fra Landsverk og ein arkitektur frá einum arkitektavirki.

Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið “um at høvuðsumvæla, útbyggja og nútíðargera Landssjúkrahúsið” verður rættliga nágreiniliga greitt frá ætlaða virkseminum í 2009 – 2012. Hinvegin verður onki nevnt um útreiðslur til skeið og ráðstevnu.

Landsgrannskoðanin heldur tí talan vera um fyrisitingarútreiðslur, sum áttu at verið hildnar av høvuðskontu:

11.20.3.04. “Landssjúkrahúsið (rakstrarjáttan)”.
11.11.1.24. “Heilsumálaráðið (rakstrarjáttan)”.
15.38.1.02. “Landsverk (rakstrarjáttan)”.

### 7.1.4 Suðuroyar sjúkrahús (rakstrarjáttan) 11.20.3.15.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 46.939 t.kr. netto. Meirnýtslan er 310 t.kr. Sambært landsstýrismanninum, hevur hann fingið at vita frá sjúkrahússtjóranum á Suðuroyar sjúkrahúsi, at meirnýtslan m.a. er:

- meirnýtsla til lønir vegna langar sjúkrameldingar, og
- bráðneyðugar útreiðslur til viðlíkahald av bygningum, m.a. í sambandi við uppvaskirúmið í sentralkøkinum.

Landsstýrismaðurin hevur boðað Suðuroyar sjúkrahús frá, at játtanin í framtíðini skal verða hildin.

### 7.1.5 Serviðgerð uttanlands (rakstrarjáttan) 11.20.3.20.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 133,6 mió.kr. Meirnýtslan er 5 mió.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 123,6 mió.kr. Í eykajáttanarlógini september 2009 varð játtanin hækkað 10 mió.kr.:

- 7,5 mió.kr. til vanligt virksemi, og
- 2,5 mió.kr. til flutning og uppihald.

Talan er um eina játtan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 89.676 | 93.280 | 3.604 |
| 22. Flutningur og uppihald | 24.451 | 25.685 | 1.234 |
| 23. Sjúklingahotellið Tórshavn | 14.470 | 15.862 | 1.392 |
| 24. Heimtøkur | 5.000 | 3.791 | -1.209 |
| **Tilsamans** | **133.597** | **138.618** | **5.021** |

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at stór áherðsla hevur verið løgd á, at játtanin til serviðgerð uttanlands skuldi halda. Kunnað er um, at stig eru tikin til tess at avmarka nýtsluna og styrkja stýringina, men talan er um eitt virkisøki, sum er sera trupult at meta um, og er tað høvuðsorsøkin til, at tað kortini ikki hevur eyðnast at halda játtanina.

Landsstýrismaðurin hevur hesa frágreiðing til meirnýtsluna

> *“Eftir fyrsta ársfjórðing í 2009 vístu framrokningar, at í ringasta føri komu 26,7 mió.kr. at vanta í. Meðan útlitini í juni vóru broytt aftur til eitt hall, sum kom at liggja um 25 mió.kr.*

*Fyrireikað varð við at uppbýta játtanina í læknafaklig búskettøki, til tess at fáa størri samanhang millum ávísing av sjúklingum og fíggjarligu ábyrgdina. Hetta var eisini eitt av tilmælunum í Valcon-frágreiðingini frá 2008. Úrslitið av hesum var, at landsstýrismaðurin fyrst í juli 2009 boðaði sjúkrahúsunum frá, at játtanin skuldi býtast út á trý búskettøki, út frá lutfalsligu nýtsluni tey seinastu árini. Tey trý búskettøkini vóru tvørgangandi fyri øll trý sjúkrahúsini: Skurðøkið, Heiliráðsøkið og Psykiatriska økið, og leiðandi yvirlæknarnir á Landssjúkrahúsinum fingu fíggjarligu ábyrgdina. Skipanin kom ikki at virka sum ætlað. Ein orsøkin er, at einki tilfeingið var at fáa skipanina at virka. Fyri at stuðla at fáa skipanina at virka, varð roynt at fáa játtan til vega í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina fyri 2010, men vann hetta ikki frama.*

*Eitt miðvíst arbeiði bleiv sett í verk til tess at økja um talið av heimtøkum, við tí fyri eyga at lækka kostnaðin, so læknafaklig serfrøði heldur kemur heim til Føroya, enn at senda fleiri sjúklingar av landinum, um hetta fíggjarliga og fakliga er skynsamt. Ein menningarstjóri er settur í starv í eina tvey ára verkætlan, frá mai mánaði í 2009. Menningarstjórin er settur fyri øll trý sjúkrahúsini, og hevur millum annað heimtøkur, sum eina av sínum menningaruppgávum*

*Samráðst varð við veitara um at fáa flogferðakostnaðin niður. Avtala varð endaliga gjørd við Atlantic Airways síðst í 2009, og eru metingar um, at sparast kunnu áleið 2 mió.kr. árliga í mun til, hvat hevur verið goldið frammanundan. Avtalan er galdandi frá 1. januar 2010.*

*Tað vóru serliga tvey tiltøk, sum vórðu sett í verk í juli 2009, ið høvdu ávirkan á útreiðslurnar til serviðgerð uttanlands.*

- *Í byrjanini av juli mánaði gav landsstýrismaðurin øllum yvirlæknum boð um, at steðgast skuldi fyri øllum ikki-akuttum sjúklingaferðum. Hetta sparitiltak stóð við árið út. (Heilsumálaráðið hevur seinni á árinum fingið skrivliga váttan frá ábyrgdarhavandi á sjúkrahúsunum, at tað einans hava verið bráðfeingis sjúklingar, sum eru sendir av landinum.)*
- *Nýggjar leiðreglur vórðu settar í verk í juli 2009, um nær sjúklingar kunna hava fylgjara við sær. Hesar vóru strangari enn tann vanliga praksisin, ið var frammanundan. Mett varð, at hetta fór at verða við til at minka um flutningsútreiðslurnar.*

*Hóast hetta gjørdi landsstýrismaðurin vart við, at neyðugt fór at verða við eykajáttan, tí at tiltøkini neyvan fóru at muna so mikið, at sparast kundu heilar 25 mió.kr.*

*Tað var vónleyst at meta um, hvussu stóra effekt hesi inntrivini fóru at hava við sær. Medio september varð gjørd ein drúgv frágreiðing um útlitini. Hædd varð tikið fyri, at tiltøkini høvdu virkað í um 2 mánaðir, og niðurstøðan var tá, at meirnýtslan fór at verða eitt stað millum 2,8 og 10 mió.kr. Hetta var áðrenn 10 mió.kr. vóru latnar við eykajáttanini. Upprunaliga varð mett, at við eykajáttan uppá 10 mió.kr. fór játtanin at halda. Mett varð, at tiltøkini, ið vóru sett í verk í juli 2009, høvdu eina samlaða sparing við sær, sum fór at verða millum 11,3 og 18,1 mió.kr. Hetta fór at viðføra, at ein møguliga kundi slaka seinni í árinum, um at einans akuttir sjúklingar vórðu sendir av landinum.*

*Miðjan november mánað varð mett, at samlaði raksturin fyri hesa høvuðskontu samlað fór at verða millum 132,9 mió.kr. og 137,7 mió.kr. Tað vil siga eitt stað millum 700 t.kr. í avlopi og 4 mió.kr. í meirnýtslu. Um miðjan desember er hetta vaksið til at verða ein meirnýtsla millum 2,2 og 4,4 mió.kr. Tá var so langt ligið út á árið, at landsstýrismaðurin hevði ikki nakran møguleika fyri at handla í mun til møguliga eykajáttan. Støðan eftir 12. tíðarskeið, uppgjørd miðjan januar 2010, vísti, at roknast kundi við einari meirnýtslu á um 5,5 mió.kr. samlað. Hetta varð áleið tað, sum úrslitið endaði við. Hóast 10 mió.kr. vóru játtaðar til økið.*

*Gongdin vísir, hvussu trupult tað er at raka neyvt í metingini, hóast tað, at tað verður fylgt væl við mánaðarliga, og neyðug stig vóru tikin fyri at tálma nýtsluni.”*

### 7.1.6 Viðgerðarstovnurin Heilbrigdi (rakstrarjáttan) 11.20.4.02.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 5.033 t.kr. Meirnýtslan er 685 t.kr. Sambært landsstýris-manninum er meirnýtslan m.a., at 645 t.kr. eru nýttar at umvæla og umbyggja ognina á Velbastað.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at stovnurin í 2009 hækkaði eitt bankalán um 1 mió.kr., sum lutvíst er nýtt til at gjalda umvælingina og umbyggingina av ognini á Velbastað, og lutvíst til at niðurgjalda rakstrarkreditt og ognarar. Sambært landsstýris-manninum hevði stovnurin eitt undirskot, góðar 500 t.kr., tá ið umlagt varð frá stuðulsjáttan til rakstrarjáttan í 2003.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at lántøkan, sum Heilbrigdi hevur gjørt í 2009, er gjørd, uttan at Heilsumálaráðið er kunnað frammanundan. Talan er um greitt brot á galdandi viðtøkur fyri sjálvsognarstovnin, har farið er út um útreiðslukarmin í árinum.

Landsstýrismaðurin hevur átalað meirnýtsluna og hevur tikið stig til at fremja um-fatandi umskipanir innan sjálvsognarstovnin. Landsstýrismaðurin ger vart við, at Heilsumálaráðið er ikki liðugt at viðgera málið.

## 7.2 Minninýtsla/frávik

### 7.2.1 Koppsetingar (lógarbundin játtan) 11.20.1.10.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 11.825 t.kr. Minninýtslan er 4.244 t.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 5.825 t.kr. Í eykajáttanarlógini apríl 2009 varð játtanin hækkað 1.000 t.kr. so at gentur, føddar í 1995, eisini kundu verða koppsettar fyri HPV (humant papillomavirus) til tess at fyribyrgja lívmóðirhálskrabba og øðrum HPV-tengdum sjúkum.

Í eykajáttanarlógini september 2009 varð játtanin hækkað 5.000 t.kr. Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina "*fer eftir ætlan ein skipan við ókeypis koppseting fyri influensu A (H1N1) at verða sett í gildi fyri ein ávísan bólk av fólkinum. Enn er ikki endaliga fastlagt, hvørji tey eru, sum skulu koppsetast. Ætlanin er at fylgja tilmælinum, sum Landslæknin og Danska heilsustýrið mæla til.*"

Landsstýrismaðurin hevur hesa frágreiðing til minninýtsluna:

> *"Tað hava tey seinastu árini verið fleiri broytingar í koppingarskránni.*
>
> *Heilsumálaráðið hevur roknað við, at tað kom at kosta gott eina mió.kr. at koppseta ein árgang av gentum fyri HPV. Hetta varð gjørt við grundarlagi í, at roknað var við, at um 85 % av gentunum tóku av tilboðnum, og svarar tað til, at tað skuldi verið um 1.785 koppsetingar í 2009. Hetta tal kom einans upp á 1.437 í 2009, og er tað ein av orsøkunum til, at avlop er á kontuni.*
>
> *Nýggja koppingin fyri pneumokokvirus er heldur ikki komin í eina fasta legu enn. Roknað verður við, at talið av koppingum fer at liggja um 2.100 um árið, tá ið hetta er kopping, ið verður latin hvørjum barni 3 ferðir um árið. Einans 1.783 koppsetingar eru framdar í 2009.*
>
> *Undirtøkan hjá pensjónistum at lata seg koppseta er ikki eins stór, og roknað hevur verið við.*
>
> *Viðvíkjandi koppingarskipanini fyri H1N1 Influensa A, útviklaði gongdin seg ikki soleiðis, sum vandi varð fyri, og tí blivu øll stigini í koppsetingarskránni ikki sett í gongd. Apoteksverkið hevði eftir boðum frá Heilsumálaráðnum bílagt koppingarevni, og hevur tað síðan eydnast at sleppa undan at taka av einum parti av ordranum. Og er hetta orsøkin til ein part av avlopinum á játtanini."*

### 7.2.2 Sjúkrakassar (stuðulsjáttan) 11.20.2.01

Í fíggjarlógini eru játtaðar 25.800 t.kr. Minninýtslan er 891 t.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 30.300 t.kr. Í eykajáttanarlógini apríl 2009 varð játtanin lækkað 4.500 t.kr.

Sambært Búskaparskipan landsins hava sjúkrakassarnir fingið 20.409 t.kr. í fyribils gjøldum. Til endaliga avrokning eru 4.500 t.kr. settar av.

Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at Heilsumálaráðið hevur samskift við Almannastovuna um, hvussu nógv skuldi setast av til endaliga avrokning, fyri at tað skuldi bera til at koma so beint á, sum gjørligt. Heilsumálaráðið heldur, at avsetingin samsvarar væl við ta upphædd, ið endaliga úrslitið fer at verða.

# 8 ALMANNAMÁL

## 8.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Barnapeningur veittur í forskoti (lógarbundin játtan) | 2.093 | 2.236 | 143 |
| Stuðul til uppihaldspening (lógarbundin játtan) | 7.953 | 8.805 | 852 |
| Fólkapensjón (lógarbundin játtan) | 403.579 | 404.556 | 977 |
| Fyritíðarpensjón (lógarbundin játtan) | 255.735 | 256.806 | 1.071 |

### 8.1.1 Barnapeningur veittur í forskoti (lógarbundin játtan) 12.21.3.04.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2.093 t.kr. netto. Meirnýtslan er 143 t.kr. netto. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 393 t.kr. netto. Í eykajáttanarlógini september 2009 varð játtanin hækkað 1.700 t.kr. netto.

Í viðmerkingunum til eykajáttanarlógina stendur, at sambært frágreiðing frá TAKS gongst verri at fáa peningin innaftur, sum er veittur sum barnapeningur í forskoti.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Forskotsrindan | 12.478 | 12.713 | 235 |
| 02. Innkrevjing av forskotsrindan av barnapeningi | -10.385 | -10.477 | -92 |
| **Tilsamans** | **2.093** | **2.236** | **143** |

Sambært landsstýrismanninum fevndi forskotsrindanin í 2009 um nakrar fáar persónar fleiri, enn mett var upprunaliga.

Innkrevjingin er til eina og hvørja tíð tengd at búskaparligu umstøðunum og gjaldsevnunum hjá tí gjaldsskylduga. Upphæddin kann tí skifta og er torfør at meta um.

### 8.1.2 Stuðul til uppihaldspening (lógarbundin játtan) 12.21.3.05

Í fíggjarlógini eru játtaðar 7.953 t.kr. Meirnýtslan er 852 t.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 8.853 t.kr. Í eykajáttanarlógini apríl 2009 varð játtanin lækkað 900 t.kr.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina *"ætlar landsstýriskvinnan at leggja eitt uppskot fyri Løgtingið um broyting av lógini, soleiðis at stuðulin til uppihaldspening broytist frá 50% til 40%. Játtanin verður tí lækkað við 900 tús. kr., samsvarandi við at broytingin í lógini fær gildi mitt í hesum árinum."*

Ll. nr. 78 frá 25. mai 2009 "um broyting í løgtingslóg um stuðul til uppihaldspening" kom í gildi 1. juli 2009. Sambært lógini er stuðulin broyttur til 40%, og hevur virkna fyri gjøld til uppihaldspening, sum falla til gjaldingar 1. juli 2009 ella seinni.

Sambært landsstýrismanninum verða umsóknir um stuðul til uppihaldspening ofta ikki sendar Almannastovuni fyrr enn seinast í árinum.

Av tí at fleiri gjaldsskyldugir persónar eru afturút við at gjalda uppihaldspening, var stórur partur av stuðulsgjøldunum, sum vórðu avgreidd seinast í 2009, uppihaldspeningur, sum var fallin til gjaldingar fyri 1. juli 2009.

### 8.1.3 Fólkapensjón (lógarbundin játtan) 12.21.8.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 403,6 mió.kr. Meirnýtslan er 1 mió.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 399,6 mió.kr. Í eykajáttanarlógini apríl 2009 varð játtanin hækkað 1,5 mió.kr. Í eykajáttanarlógini september 2009 varð játtanin hækkað 2,5 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum vóru fleiri pensjónistar í skipanini, enn væntað var.

### 8.1.4 Fyritíðarpensjón (lógarbundin játtan) 12.21.8.05.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 255,7 mió.kr. Meirnýtslan er 1,1 mió.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 251,3 mió.kr. Í eykajáttanarlógini apríl 2009 varð játtanin hækkað 0,9 mió.kr. Í eykajáttanarlógini september 2009 varð játtanin hækkað 3,55 mió.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Hægsta fyritíðarpensjón | 110.717 | 113.668 | 2.951 |
| 02. Miðal fyritíðarpensjón | 94.151 | 93.947 | -204 |
| 03. Lægsta fyritíðarpensjón | 46.714 | 45.011 | -1.703 |
| 04. Avlamisveiting | 2.758 | 2.877 | 119 |
| 05. Læknaváttanir | 1.395 | 1.303 | -92 |
| **Tilsamans** | **255.735** | **256.806** | **1.071** |

Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at nakað av flyting hevur verið millum sløgini av fyritíðarpensjónum, sum torført hevur verið at mett um.

Orsøkin til hesar flytingar er serliga broytingin í almannapensjónslógini, sum fekk virknað lutvíst frá 1. januar 2008 og lutvíst frá 1. januar 2009, men eisini aðrar flytingar hava verið av persónum í skipanini.

Undirkonta 01 “Hægsta fyritíðarpensjón”

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 3,0 mió.kr.

Skipanin var, sambært landsstýrismanninum, at umsøkjarar eldri enn 60 ár, sum luku treytirnar at fáa hægstu fyritíðarpensjón, fingu miðal fyritíðarpensjón.

Eftir 1. januar 2009 fingu hesir umsøkjarar játtað hægstu fyritíðarpensjón. Pensjónistar við somu fortreytum, sum vóru í skipanini, kundu søkja um at fáa hægstu fyritíðarpensjón.

Broytta skipanin, og lutvíst aðrar flytingar av persónum í skipanini, hava havt við sær, at fleiri fáa hægstu fyritíðarpensjón, og eisini nakað av eftirgjøldum.

Undirkonta 03 “Lægsta fyritíðarpensjón”

Á hesari undirkontu eru minniútreiðslurnar 1,7 mió.kr.

Skipanin var, sambært landsstýrismanninum, at umsøkjarar eldri enn 60 ár, sum luku treytirnar at fáa miðal fyritíðarpensjón, fingu lægstu fyritíðarpensjón.

Eftir 1. januar 2009 fingu hesir umsøkjarar játtað miðal fyritíðarpensjón. Pensjónistar við somu fortreytum, sum vóru í skipanini, kundu søkja um at fáa miðal fyritíðar-pensjón.

Broytta skipanin, og lutvíst aðrar flytingar av persónum í skipanini, hava havt við sær, at færri fáa lægstu fyritíðarpensjón.

## 8.2 Minninýtsla/frávik

### 8.2.1 Dugni-skúlin (løgujáttan) 12.21.1.09.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 500 t.kr. At kalla ongin peningur er brúktur, og minninýtslan er 493 t.kr.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina skulu atkomuviðurskiftini á skúlanum broytast, so fólk við rørslutarni lættari kunnu fáa atgongd til skúlan.

Sambært landsstýrismanninum kom arbeiðið ongantíð í gongd, av vantandi byggi-loyvi, og er soleiðis ikki gjørt. Tær um 7 t.kr. eru goldnar til Landsverk.

Í fíggjarlógini 2010 er ongin játtan.

### 8.2.2 Dagpeningaskipanin (lógarbundin játtan) 12.21.4.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 57.054 t.kr. netto. Minninýtslan er 1.858 t.kr. netto. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 59.054 t.kr. netto. Í eykajáttanarlógini september 2009 varð játtanin lækkað 2.000 t.kr. netto.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Løntakarar | 58.212 | 56.537 | -1.675 |
| 02. Sjálvstøðug og húsarhaldsfólk | 1.279 | 1.323 | 44 |
| 04. Gjald fyri læknaváttanir | 814 | 564 | -250 |
| 05. Arbeiðsgevarans partur, dagpengar | -3.251 | -3.228 | 23 |
| **Tilsamans** | **57.054** | **55.196** | **-1.858** |

Undirkonta 01 “Løntakarar”

Á hesari undirkontu eru minniútreiðslurnar 1,7 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum eru útgjøld úr dagpeningaskipanini tengd at búskap-arligu støðuni í samfelagnum, serliga við atliti at arbeiðsplássum við nógvum tíma-løntum starvsfólki. Seinastu tvey árini eru fleiri tímalønt vorðin arbeiðsleys og eru farin í ALS. Tí er nýtslan á hesari kontu minni, enn upprunaliga mett.

Av misgáum eru 945 t.kr., ið viðvíkja 2009, bókaðar í roknskapinum 2010. Minniút-reiðslan í 2009 var tí í veruleikan um 730 t.kr.

### 8.2.3 Serforsorg (rakstrarjáttan) 12.21.6.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 143,7 mió.kr. Minninýtslan er 4,2 mió.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 144,1 mió.kr. Í eykajáttanarlógini september 2009 varð játtanin lækkað 0,4 mió.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Trivnaðartænastan | 97.651 | 94.516 | -3.135 |
| 21. Stovnsuppihald o.a. í Danmark | 20.957 | 20.860 | -97 |
| 22. Endurgj. av pens. til føroyingar í Danmark | 1.313 | 1.197 | -116 |
| 23. Ferðaútreiðslur til klientar og avvarðandi | 50 | 28 | -22 |
| 26. Deildin fyri sinnisveik | 19.807 | 19.277 | -530 |
| 27. Heim fyri heilaskadd | 3.879 | 3.564 | -315 |
| **Tilsamans** | **143.657** | **139.442** | **-4.215** |

Undirkonta 20. "Trivnaðartænastan"

Á hesari undirkontu eru minniútreiðslurnar 3,1 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum varð ein partur av játtanini settur av til rakstur av húsinum í Klaksvík til børn við autismu. Húsið í Klaksvík varð ikki tikið í nýtslu í 2009.

Somuleiðis varð játtan sett av til at víðka um virksemið á verkstaðnum á Stíggi, men tá avtornaði eydnaðist tað ikki at seta tað í verk í 2009.

Undirkonta 21. "Stovnsuppihald o.a. í Danmark"

Sambært Búskaparskipan Landsins eru 38 t.kr. rindaðar til eitt fólk at fylgja við viðurskiftunum hjá føroyingum, sum búgva á stovni í Danmark.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2005 umrøddi Landsgrannskoðanin, at á løgtingsfíggjarlógini 2005 vóru 50 t.kr. játtaðar á kontu 8.21.6.01.21. "Stovnsuppihald o.a. í Danmark" til at fylgja betur við viðurskiftunum hjá føroyingum, sum búgva á stovni í Danmark, og í fíggjarlógaruppskotinum 2006 var skotið upp at játta 100 t.kr. til sama endamál. Landsgrannskoðanin helt ikki, at roknskapurin verður nóg gjøgnumskygdur, um ein stovnur pilkar út nakrar av sínum útreiðslum, og spjaðir tær meira ella minni tilvildarliga út á aðrar játtanir, ið stovnurin hevur ræði á. Henda mannagongd kann eisini verða við til at fjala hækkandi fyrisitingarútreiðslur.

Landsgrannskoðanin helt tá, og heldur framvegis, at talan er um fyrisitingarútreiðslur, sum skulu vera avhildnar á høvuðskontu 12.21.6.08. "Nærverkið, Meginskrivstovan".

Landsstýrismaðurin vísir hinvegin á, at útreiðslan er bókað, har peningurin er játtaður.

Undirkonta 22. "Endurgjald av pensjón til føroyingar í Danmark"

Sambært Búskaparskipan Landsins eru 197 t.kr. endurrindaðar til eina kommunu í Danmark. Avsettar vóru 1.000 t.kr.

Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at ongi onnur krøv eru komin. Nærverkið hevur sett seg í samband við eina kommunu í Danmark, og sambært hesari kommununi

verða rokningar sendar fyri føroyingar, sum eru á stovni hjá teimum. Í mai 2010 hevur Nærverkið ikki enn fingið rokningarnar.

### 8.2.4 Bústovnar o.a. (løgujáttan) 12.21.6.02.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 26,3 mió.kr. Minninýtslan er 6,8 mió.kr.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er játtanin ætlað:

a) Húsið í Klaksvík til børn við autismu,
b) Sambýlinum í Tórshavn til sinnisveik,
c) Økisdeplinum í Vági til sinnisveik, og
d) til at fyrireika tvær verkætlanir til børn og ung.

Ad a) Húsið í Klaksvík til  børn við autismu

Í 2007 vórðu eini hús í Klaksvík keypt fyri 5 mió.kr.

Sambært Búskaparskipan Landsins eru 6 mió.kr. nýttar í 2009. Tilsamans eru 6,5 mió.kr. nýttar árini 2007 til 2009 til at gera húsini klár.

Í brotinum um Innlendismál er greitt frá, at á høvuðskontu 15.37.4.10. "Orkunýtsla í almennum bygningum" eru nýttar 480 t.kr. til eina eyka bjálving av útveggjum, lofti og kjallaragólvi.

Í mai 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at *"væntað verður, at húsini verða klár at taka í nýtslu í nærmastu framtíð."*

Ad b) Sambýlið í Tórshavn til sinnisveik

Sambært Búskaparskipan Landsins eru 894 t.kr. nýttar í 2008 og 131 t.kr. í 2009.

Sambært Ll. nr. 23/2008 "um bygging av sambýli í Tórshavn til sinnisveik" kunnu útreiðslurnar til verkætlanina í mesta lagi vera 16,2 mió.kr.

Landsstýrismaðurin kunnaði í juni 2009 um, at hann síðst í 2008 hevur fingið eitt tilmæli frá bygginevndini. Landsstýrismaðurin tók ikki undir við tilmælinum, av tí at byggingin var ov kostnaðarmikil, men gjørdi av at fara undir at kanna møguleikarnar fyri alternativari bygging. Ein ætlan skuldi vera klár seinni í 2009.

Í mai 2010 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at hann hevur ivast í verkætlanini, og er verkætlanin tí ongantíð farin ígongd.

Í mai 2010 hevur landsstýrismaðurin gjørt av at venda aftur til verkætlanina, sum bygginevndin handaði Almannamálaráðnum í 2006. Bygginevndin, saman við Landsverk, fer at verða biðin um at endurskoða byggikostnaðin.

Verklagslógin fer úr gildi við árslok 2010. Tí verður neyðugt at leingja/broyta verandi lóg.

Ad c) Økisdepil í Vági til sinnisveik

Sambært Búskaparskipan Landsins eru nýttar 1,7 mió.kr. í 2008 og 13,2 mió.kr. í 2009.

Sambært landsstýrismanninum var ætlanin at nýta 15,6 mió.kr. í 2009, men einans 13,3 mió.kr. vórðu brúktar. Trupulleikar vóru at fáa gongd á verkætlanina, men síðani manningartalið er komið í rættlag, hevur verkætlanin gingið sum ætlað.

Sambært Ll. nr. 24/2008 “um bygging av økisdepli í Vági til sinnisveik” v.s.b. kunnu útreiðslurnar til verkætlanina í mesta lagi vera 32,6 mió.kr.

Ætlanin er, at arbeiðið skal verða liðugt í seinasta lagi í 2011, tá verklagslógin fer úr gildi.

Ad d) Fyrireiking av tveimum verkætlanum til børn og ung

Ongin peningur er brúktur. Sambært landsstýrismanninum eru verkætlanirnar ikki farnar í gongd.

### 8.2.5 **Eldrarøkt** (rakstrarjáttan) 12.21.6.04.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 323,2 mió.kr. netto. Minninýtslan er 6,4 mió.kr.netto.

Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 319,3 mió.kr. netto. Í eykajáttanarlógini apríl 2009 varð játtanin hækkað 3,9 mió.kr. netto.:

- 0,4 mió.kr. til ellis- og røktarheim til hækkaða kostnaðin av heilivági, og
- 3,5 mió.kr. til heimatænastuna til brúkarar, sum hava bráfeingistørv á búplássi.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Røktarheim | 184.641 | 183.090 | -1.551 |
| 23. Eldrarøkt í Sandoynni | 12.532 | 12.534 | 2 |
| 25. Heimatænastan | 123.305 | 118.624 | -4.681 |
| 27. Økisterapi | 2.698 | 2.497 | -201 |
| **Tilsamans** | **323.176** | **316.745** | **-6.431** |

Undirkonta 20 “Røktarheim”

Á hesari undirkontu eru minniútreiðslurnar 1,5 mió.kr.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at Nærverkið, sum umsitur játtanina, ikki hevði tillutað alla játtanina til røktarheimini, men sett ein part av til møguliga afturvendandi meirnýtslu hjá ávísum røktarheimum. Tað varð gjørt fyri ikki aftur at koma í somu støðu sum í t.d. 2008, tá neyðugt varð at søkja um eykajáttan seinast í fíggjarárinum. Almannamálaráðið hevði eisini boðað Nærverkinum frá, at landsstýrismaðurin ikki fór at góðtaka afturvendandi meirnýtslu hjá røktarheimum. Fleiri røktarheim hava egna roknskaparskipan og senda inn FSL-bókingarskjøl.

Nærverkið boðaði Almannamálaráðnum frá í mars 2009, at framrokningar av nýtsluni hjá røktarheimum fyrstu mánaðirnar vístu eina meirnýtslu á ávísum heimum í mun til ta játtan, sum tey høvdu fingið tillutað.

Í apríl 2009 og í juni 2009 var fundur millum Nærverkið og røktarheimsleiðararnar, har fíggjarviðurskiftini vóru á skránni.

Í august 2009 hevði Almannamálaráðið somuleiðis fund við Nærverkið, saman við røktarheimsleiðarunum, har stórur dentur varð lagdur á, at játtanin skuldi verða hildin.

Í september 2009 kallaði Nærverkið stýrini á teimum heimum, sum framroknað vístu meirnýtslu, inn til fundar at viðgera fíggjarstøðuna. Stýrini fingu tá álagt at seta tiltøk í verk, fyri at halda seg innanfyri játtanarkarmin.

Tá landsroknskapurin 2009 lat aftur, vísti tað seg, at nýtslan hjá viðkomandi stovnum ikki hevði verið so stór, sum roknað varð við.

Undirkonta 25 “Heimatænastan”

Á hesari undirkontu eru minniútreiðslurnar 4,7 mió.kr.

Í apríl 2009 fekk Nærverkið boð frá landsstýrismanninum, at eykajáttanin 3,5 mió.kr., sum varð samtykt í apríl 2009, skuldi verða stýrd frá Meginskrivstovuni fyri at tryggja, at peningurin fór til rætt endamál.

Nærverkið bað síðani økisleiðararnar um at søkja um játtan til brúkarar, sum høvdu bráfeingistørv á búplássi. Fyrsta stigið hjá økisleiðarunum var at fáa visitator út at visitera brúkararnar. Síðani skuldu økisleiðararnir senda umbøn um játtan til Nærverkið. Nærverkið játtaði síðani pening av eykajáttanini, soleiðis at økisleiðararnir kundu fara út at søkja eftir starvsfólki.

Henda málsviðgerð tók tíð, so tað kom út í summarfrítíðina. Nærverkið hevur sum er trupulleikar at fáa starvsfólk til allar vanligar heimahjálparatímar, og at seta fleiri fólk til nýggjar uppgávur var nærum vónleyst í summarfrítíðini.

Tí kom, sambært landsstýrismanninum, játtanin til bráðfeingistørv ikki at virka við hægri tænastustøði fyrr enn í august mánaði 2009.

Nærverkið tók atlit at stóru óvissuni, um eykajáttanin 3,5 mió.kr. varð framskrivað til fult virksemi í 2010. Fyri at halda eina javna tænastu, og fyri ikki at skulu minka um tænastuna aftur í 2010, helt Heimatænastan ikki, at meira virksemi skuldi verða sett í gongd í 2009.

### 8.2.6 Lán til ellis- og røktarheim í Vági (løgujáttan) 12.21.6.14.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 9,3 mió.kr. Minninýtslan er 8,5 mió.kr.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at byggingin av røktarheiminum í Vági fór ikki rættiliga ígongd í 2009.

Sambært landsroknskapinum eru nýttar 5,6 mió.kr. tilsamans árini 2007 til 2009.

Sambært Ll. nr. 118/2006 “um lán til bygging av ellis- og røktarheimi í Vági” v.s.b. er heimilað landsstýrismanninum at veita kommununum í sunnaru helvt í Suðuroynni lán fyri í mesta lagi 35,19 mió.kr. til at keypa grundøki, at gera tað byggibúgvið og at byggja ellis- og røktarheim í Vági.

### 8.2.7 Eldrasambýli (løgujáttan) 12.21.6.16.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2,8 mió.kr. Ongin peningur er brúktur. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 14,8 mió.kr. Í eykajáttanarlógini desember 2009 varð játtanin lækkað 12 mió.kr., tí at væntandi fór nærum ongin nýtsla at verða.

Sambært landsstýrismanninum fóru verkætlanirnar, sum tilsagnir vóru givnar um, ikki í gongd.

### 8.2.8 Vanlig Forsorg (lógarbundin játtan) 12.21.7.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 163 mió.kr. netto. Minninýtslan er 6,8 mió.kr. netto.

Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 150,1 mió.kr. netto. Í eykajáttanarlógini apríl 2009 varð játtanin hækkað 5 mió.kr. netto:

t.kr.

| Undirkonta | Eykajáttan |
|---|---:|
| 04. Meirútreiðslur brekað barn § 17 | 9.079 |
| 06. Hjálparamboð v.m. § 18 | -4.098 |
| **Tilsamans** | **4.981** |

Í eykajáttanarlógini september 2009 varð játtanin hækkað 7,9 mió.kr. netto:

t.kr.

| Undirkonta | Eykajáttan |
|---|---:|
| 01. Fyribils hjálp § 9 | 1.700 |
| 04. Endurbúgving § 18 | -1.500 |
| 06. Hjálparamboð v.m. § 18 | 4.000 |
| 07. Arbeiðsloysisforsorg § 9, stk. 2 | 1.700 |
| 08. Hjálp til viðgerð o.a. á serligum stovnum § 16 | 2.000 |
| **Tilsamans** | **7.900** |

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---:|---:|---:|
| 01. Fyribils hjálp § 9 | 15.977 | 16.547 | 570 |
| 02. Varandi veiting § 13 | 1.170 | 841 | -329 |
| 03. Stakútreiðslur § 15 | 3.800 | 3.264 | -536 |
| 04. Meirútreiðslur brekað barn § 17 | 29.997 | 28.422 | -1.575 |
| 05. Endurbúgving § 18 | 37.500 | 38.520 | 1.020 |
| 06. Hjálparamboð v.m. § 18 | 46.402 | 38.081 | -8.321 |
| 07. Arbeiðsloysisforsorg § 9, stk. 2 | 10.884 | 12.137 | 1.253 |
| 08. Hjálp til viðgerð o.a. á serligum stovnum § 16 | 12.070 | 10.616 | -1.454 |
| 09. Hoyritól | 5.204 | 7.741 | 2.537 |
| **Tilsamans** | **163.004** | **156.169** | **-6.835** |

### Minniútreiðslur

Undirkonta 04 “Meirútreiðslur brekað barn § 17”

Á hesari undirkontu eru minniútreiðslurnar 1,6 mió.kr.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at nýtslan á hesari kontu er skiftandi og er torfør at meta um. Minninýtslan í 2009 stendst serliga av lægri útreiðslum til heilivág seinast í árinum.

Undirkonta 06 “Hjálparamboð v.m. § 18”

Á hesari undirkontu eru minniútreiðslurnar 8,3 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum vórðu útreiðslurnar til akfør lægri, enn mett var. Harumframt eru útreiðslurnar til kostískoyti, heilivág, tannviðgerð o.a. nakað lægri.

Nøkur dýr íbúðarmál vórðu heldur ikki avgreidd fyri árslok 2009. Fleiri mál undir hesari kontu taka tíð. Harumframt hevur tað ávirkan, hvørt umsóknir um hjálpartól kunnu nøktast við tólum, sum eru á goymslu hjá Hjálpartólamiðstøðini, ella um tey skulu keypast í árinum.

Undirkonta 08 “Hjálp til viðgerð o.a. á serligum stovnum § 16”

Á hesari undirkontu eru minniútreiðslurnar 1,5 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum er tað serliga, tí persónar eru fluttir frá § 18 “endurbúgving”. Torført hevur verið at mett neyvt um, hvussu stór játtan skuldi verða flutt frá § 18 til § 16.

### Meirútreiðslur

Undirkonta 05 “Endurbúgving § 18”

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 1,0 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum er tað serliga, tí persónar eru fluttir til § 16 “hjálp til viðgerð o.a. á serligum stovnum”. Torført hevur verið at mett neyvt um, hvussu stór játtan skuldi verða flutt frá § 18 til § 16.

Undirkonta 07 “Arbeiðsloysisforsorg § 9, stk. 2”

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 1,3 mió.kr.

Landsstýrismaðurin vísir á, at útreiðslurnar til arbeiðsloysisforsorg eru tengdar at búskaparligu støðuni í samfelagnum, og um persónar í hesari skipan hava møguleika at fáa stuðul ella partvísan stuðul frá ALS.

Sambært landsstýrismanninum er meirnýtslan í 2009 serliga íkomin, tí útgjøldini vórðu hægri seinastu mánaðirnar í 2009.

Undirkonta 09 “Hoyritól”

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 2,5 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum vóru samlaðu útreiðslurnar til hoyritól fyrstu 8 mánaðirnar av 2009 3,3 mió.kr. Seinastu 4 mánaðirnar komu rokningar fyri 4,4 mió.kr.

# 9 Innlendismál

## 9.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Umvæling av almennum bygningum (løgujáttan) | 12.000 | 12.365 | 365 |
| Umhvørvisstovan (rakstrarjáttan) | 19.633 | 19.774 | 141 |
| Orkunýtsla í almennum bygningum (løgujáttan) | 15.000 | 15.132 | 132 |

### 9.1.1 Umvæling av almennum bygningum (løgujáttan) 15.11.1.56.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 12.000 t.kr. Meirnýtslan er 365 t.kr.

Í fíggjarlógini var upprunaliga eingin játtan. Í eykajáttanarlógini apríl 2009 vórðu 12.000 t.kr. játtaðar.

Sambært Búskaparskipan Landsins er talan um hesar verkætlanir:

kr.

| Heiti | Roknskapur |
|---|---|
| 1) Landssjúkrahúsið, umvæling | 2.955.944 |
| 2) Regulering til ráðini - 2009 | 1.465.146 |
| 3) Kokkaskúlin í Klaksvík | 1.237.801 |
| 4) Skúlin á Trøðni | 981.457 |
| 5) Studentaskúlin í Hoydølum | 803.072 |
| 6) Skúlaheimið í Klaksvik | 663.915 |
| 7) Veðurstøðin | 608.718 |
| 8) Innlendismálaráðið | 442.597 |
| 9) Bústovnurin Børkugøta 1 | 318.988 |
| 10) Heimið á Mýruni, Saltangará | 311.140 |
| 11) Studentaskúlin & HF-skeiðið í Fuglafirði | 309.825 |
| 12) Prestagarðurin á Todnesi | 308.950 |
| 13) Prestagarðurin í Sandágerði | 266.374 |
| 14) Handilsskúlin á Kambsdali | 263.610 |
| 15) Listasavn Føroya | 263.559 |
| 16) Norðoya Ellis- & Røktarheim | 241.837 |
| 17) Læraraskúlin (venjingarskúlin) | 180.381 |
| 18) Mentamálaráðið høvuðsbygningur | 98.591 |
| 19) Sambýlið undir Fobbakletti | 93.514 |
| 20) Løgmansskrivstovan | 87.751 |
| 21) Kristnastova | 63.090 |
| 22) Maskinstøðin á Lambareiði | 61.839 |
| 23) Sambýlið Niðaragøta 15 | 45.218 |
| 24) Havstovan | 41.911 |
| 25) Búnaðardepilin | 32.000 |

| Heiti | Roknskapur |
|---|---:|
| 26) Trygdarmiðstøð í Klaksvík | 29.500 |
| 27) Portugálið | 29.430 |
| 28) Føroya Handilsskúli | 28.593 |
| 29) Suðuroyar Sjúkrahús, umvæling  og viðlíkahald | 28.369 |
| 30) Prestagarðurin á Brekku | 25.762 |
| 31) Tilbúgvingarstovnurin | 25.000 |
| 32) Tekniskar leiðingar í Tinganesi | 21.381 |
| 33) Prestagarðurin í Fuglafirði | 9.328 |
| 34) Samdøgurstovnurin Slóðin | 8.420 |
| 35) Ógreinað. | 6.885 |
| 36) Prestagarðar generelt | 3.731 |
| 37) Kumpashúsið | 1.085 |
| 38) Bygningsviðlíkahald | 600 |
| **Tilsamans** | **12.365.312** |

Sambært Búskaparskipan Landsins eru á hesari høvuðskontu bókaðar 188 t.kr. í lønum til starvsfólk hjá Landsverki.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at starvsfólk hjá Landsverki, sum arbeiða við ymiskum verkætlanum, skriva tímaseðlar, har tey regluliga skráseta tímanýtslu sína á tær verkætlanirnar, sum tey arbeiða við. Tímanýtslan verður síðani bókað út á verkætlanirnar.

Málið um lønarútreiðslur á løgukontum hevur verið gjøllari viðgjørt í frágreiðingum til løgtingsgrannskoðararnar, m.a. á s. 49 – 51 í “frágreiðing um frávik og nýtslu o.a.” frá september 2008.

Ad 1) Landssjúkrahúsið umvæling

Nýttar eru slakar 3 mió.kr.

Vit spurdu, hví útreiðslurnar eru bókaðar á hesa høvuðskontu í staðin fyri á høvuðskontu  11.20.3.08. “Landssjúkrahúsið, útbygging (løgujáttan)”, sum er ætlað til útbygging, umbygging og umvæling av Landssjúkrahúsinum,

Í mai 2010 svaraði landsstýrismaðurin:

> *“Landssjúkrahúsið hevur nógvar bygningar um hendi, og fleiri av bygningunum eru í sera ringum standi. Tí hevur verið neyðugt at brúkt eina munandi upphædd til hesar bygningar. Arbeiðini hava snúð seg um vanligt leypandi viðlíkahald á ymsar bygningar hjá Landssjúkrahúsinum, og ikki stórar høvuðsumvælingar.*
>
> *Tað er grundin til, at peningur er brúktur av hesari játtan og ikki á høvuðskonto 11.20.3.08, sum fyrst og fremst var brúkt til at gera nýggjar útsíður (klimaskerm) á landssjúkrahúsinum í 2009.”*

Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið um at høvuðsumvæla, útbyggja og nútíðargera Landssjúkrahúsið (Lm. nr. 51/2008), sum varð samtykt 19. desember 2008 (Ll. nr. 129/2008), verður m.a. greitt frá ætlaða virkseminum:

1. *Endurnýggjan av útsíðum og tekju (klimaskerminum) á B-bygninginum.*

2. *Útbygging av B-bygninginum og niðurtøka av C-bygninginum.*
3. *Fyrireiking av nýbygging av Psykiatriska deplinum umframt átrokandi umvælingar.*
4. *Neyðugar umvælingar av bygningum annars hjá Landssjúkrahúsinum.*
5. *Ávegis umvælingar og flytingar av verandi funksjónum.*

> <u>*Ad 4: Neyðugar umvælingar av bygningum annars hjá Landssjúkrahúsinum*</u>
>
> *"Tænastubygningar, køkur og vaskarí:*
>
> *Í langtíðarløguætlanini er lagt upp til, at tær neyðugu ábøturnar sambært støðumetingini frá 1999 verða framdar so hvørt, sum rúmd er fyri tí í mun til játtanina.*
>
> *Tænastubygningarnir hjá Landssjúkrahúsinum hava leingi verið í ringum standi, og ábøtur verða alsamt meira átrokandi. Ætlandi verður partur av játtanini komandi árini nýttur til hetta endamál.*
>
> *Umframt byggitøkniligar umvælingar kann nevnast, at køkurin eigur at dagførast, so raksturin gerst meira skynsamur. Goymsluhølini liggja illa fyri, og inniluftin í vaskarínum og seingjarreingerðini er vánalig.*
>
> *Vaskarínum tørvar íløgur í tøkni, so raksturin gerst skynsamari og tryggari, umframt at tørvur er á at umvæla hølini sum heild."*

Útreiðslurnar 3 mió.kr. á hesari høvuðskontu eru m.a nýttar til ábøtur á vaskarínum, harímillum at skifta turkitrumlu og eltalvu.

Tað gongur greitt fram av almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið um at høvuðsumvæla, útbyggja og nútíðargera Landssjúkrahúsið, at endamálið er m.a. viðlíkahald á vaskarínum og at gera løgur í tøknina.

Landsgrannskoðanin hevur tí ilt við at skilja svarið frá landsstýrismanninum *"at peningur er brúktur av hesari játtan og ikki á høvuðskonto 11.20.3.08, sum fyrst og fremst var brúkt til at gera nýggjar útsíður (klimaskerm) á landssjúkrahúsinum í 2009".*

Í juni 2010 hevur landsstýrismaðurin víst á, at *"tað at viðlíkahalda, skifta vindeygu út sum leka, gera málaraarbeiði og nýta pening til ábøtur á vaskarínum gagnar sera nógvum fólkum. Stór nytta fæst fyri peningin.*

*Tá meginparturin av høvuðskontu 11.20.3.08. Landssjúkrahúsið, útbygging (løgujáttan) bleiv brúkt til klimaskermin í B- bygninginum, kom tað sera væl við at kunna brúka pening av felagsjáttanunum til onnur endamál. Meginpartin í øðrum bygningum."*

Landsgrannskoðanin skal vísa á viðmerkingar sínar seinni í frágreiðingini.

<u>D 2) Regulering til ráðini – 2009</u>

Nýttar eru 1,5 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum eru útreiðslurnar nýttar til:

| | |
|---|---|
| *Arbeiði í sambandi við brunatrygd av P-kjallara í Mentamálaráðnum* | *1,2 mió.kr.* |
| *Smærri viðlíkahald á Fornminnissavninum* | *0,1 mió.kr.* |
| *Umvæling av 3. hædd á Vinnuháskúlanum* | *0,2 mió.kr.* |

<u>Ad. 5) Studentaskúlin í Hoydølum</u>

Nýttar eru 803 t.kr.

Vit spurdu, hví útreiðslurnar eru bókaðar á hesa høvuðskontu í staðin fyri á høvuðs-kontu 7.23.3.28. "Studentaskúlin í Hoydølum (løgujáttan)".

Í mai 2010 hevur landsstýrismaðurin svarað:

> *"Studentaskúlin er í ógvuliga ringum standi. Játtanin á høvuðskonto 7.23.3.28 rakk ikki til tað mest neyðuga arbeiði til tess at lúka tey krøv, sum Brunaumsjón landsins, og Arbeiðseftirlitið seta til studentaskúlan. Tí varð peningur eisini játtaður av kontuni "umvæling av almennum bygningum", sum eisini má metast at verða samsvarandi endamálinum við kontuni."*

Í viðmerkingunum til fíggjarlógina verður Løgtingið kunnað um, at játtanin 5,5 mió.kr. á høvuðskontu 7.23.3.28. "Studentaskúlin í Hoydølum (løgujáttan)" *"er ætlað til íløgur í sambandi við krøv frá Brunaumsjón Landsins og Arbeiðseftirlitinum."*

Landsgrannskoðanin undrast tí á, at peningur á høvuðskontu "umvæling av almennum bygningum" verður nýttur. Landsgrannskoðanin heldur ikki grundgevingina vera nóg góða, at játtanin á høvuðskontu 7.23.3.28. "Studentaskúlin í Hoydølum (løgujáttan) *"rakk ikki til tað mest neyðuga arbeiði til tess at lúka tey krøv, sum Brunaumsjón landsins, og Arbeiðseftirlitið seta til studentaskúlan."*

Í juni 2010 hevur landsstýrismaðurin í innlendismálum víst á, at *"í Studentaskúlanum ganga fleiri hundrað næmingar umframt lærarar og annað starvsfólk. Fólk gerast sjúk av vánaligum inniklima, og lýkur skúlin ikki tey krøv Brunaumsjón landsins setur. Ein sera hættislig støða."*

Í brotinum undir Mentamálum er greitt frá, at á høvuðskonta 7.23.3.28. "Studentaskúlin í Hoydølum (løgujáttan)" vóru játtaðar 5.500 t.kr., og meirnýtslan er 364 t.kr.

Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur greitt frá, at arbeiðið at umvæla høvuðsbygningin vísti seg at verða truplari og at kosta meira, enn roknað varð við. Til tess at fylgja krøvunum hjá Arbeiðseftirlitinum kundi arbeiðið ikki stegða upp, og neyðugt var at gera arbeiðið liðugt í 2009.

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at Landsverk hevur ræðisrættin á høvðuskontu 7.23.3.28. "Studentaskúlin í Hoydølum (løgujáttan)". Eftir okkara tykki átti Landsverk tí at havt vent til sær til Mentamálaráðið, ið varðar av kontuni til Studentaskúlan í Hoydølum, í staðin fyri at nýta pening av høvuðskonta 15.11.1.56. "Umvæling av almennum bygningum."

## Ad. 29) Suðuroyar Sjúkrahús umvæling og viðlíkahald

Nýttar eru 28 t.kr. Vit spurdu, hví útreiðslurnar eru bókaðar á hesari høvuðskontu í staðin fyri á høvuðskontu  11.20.3.16. "Suðuroyar Sjúkrahús (løgujáttan)".

Í mai 2010 hevur landsstýrismaðurin svarað:

> *"Upphæddin er fyri ráðgeving frá P/f 87 um kravspesifikatiónir av lekum og annað. At henda kontan hevur fingið sína játtan, er tí, at Landsverk yvirtók høvuðskonto 11.20.3.16 í nov/des 2009, aftan á at nevnda kanning var gjørd."*

Landsgrannskoðanin hevur ilt við at skilja eitt slíkt svar. Um Landsverk hevur ræðisrætt yvir høvuðskontu  11.20.3.16. "Suðuroyar Sjúkrahús (løgujáttan)" ella ikki, er málinum óviðkomandi.

Í juni 2010 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at ymiskar kanningar vórðu settar í verk á landsins stovnum fyri at staðfesta tørvin á ábótum. Útreiðslurnar av hesum arbeiði vórðu bókaðar á kontuna fyri "Umvæling av almennum bygningum", tí tað var eitt arbeiði, sum Landsverk sjálvt setti í verk.

### 9.1.2 Umhvørvisstovan (rakstrarjáttan) 15.37.4.02.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 19.633 t.kr. netto. Meirnýtslan er 141 t.kr. netto.

Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 19.333 t.kr. Í eykajáttanarlógini september 2009 varð játtanin hækkað 300 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum gjørdust inntøkurnar nakað lægri enn mett var. Stórar sparingar vórðu gjørdar á stovninum fyri at fáa játtanina at halda, men innan lønarútreiðslur vísti tað seg at verða trupult at fremja ætlaðu sparingarnar.

### 9.1.3 Orkunýtsla í almennum bygningum (løgujáttan) 15.37.4.10.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 15.000 t.kr. Meirnýtslan er 132 t.kr.

Sambært Búskaparskipan Landsins er meginparturin av útreiðslunum, 13,3 mió.kr., bókaður í november/desember 2009 og januar 2010. Vit bóðu um gjøllari frágreiðing.

Í mai 2010 hevur landsstýrismaðurin svarað:

> *"Játtanin til orkunýtslu í almennum bygningum er ein nýggj játtan, og eitt nýtt virksemisøki.*
>
> *Neyðugt var at gera neyvar forkanningar til tess at tryggja sær, at peningurin varð nýttur so fíggjarliga skilagott sum gjørligt. Avrátt varð tí at seta seg í samband við ráðgevarafyritøkur, við serkunnleika innan økið, og biðja tær um at skráseta og gera eina frágreiðing um ymsu bygningarnar.*
>
> *Slíkar kanningar taka tíð, og varð tí bíðað til tær flestu kanningarnar vóru lidnar, fyri at kunna gera eina heildarætlan, og brúka játtanina optimalt. Hetta var á heysti 2009, og var tá beinanvegin farið undir umvælingarnar. Rokningar fyri framt arbeiði, kunnu koma tá nakað er útliðið, eisini eftir árslok."*

Sambært Búskaparskipan Landsins er talan um hesar verkætlanir:

kr.

| Heiti | Roknskapur |
|---|---|
| 1) Akstovan í Tórshavn:<br>Skift vindeygu, hurðapartí, fasadu og tak í millumbygningi. Arbeiðið varð gjørt liðugt í 2009. | 2.540.486 |
| 2) Orkunýtsla, Skansapakkhúsið og Salurin:<br>Bjálvað og umvælt fasadu. Arbeiðið er ikki liðugt. | 2.342.460 |
| 3) Høvuðsbygningur, Klaksvíkar Sjúkrahús:<br>Bjálvað tekju. Útskift termorútar. Nýggja ventilatiónsskipan og nýggjan ketil. Arbeiðið er ikki heilt liðugt. Írestandi arbeiði fyri um 100 t.kr. verður væntandi gjørt í 2010. | 2.136.834 |
| 4) Orkunýtsla í almennum bygningum:<br>Skrásetingar og forkanningar, sum neyðugar vóru at gera fyri at kunna fara undir at bjálva landsins bygningar. | 1.352.451 |
| 5) Lærlingaheimið, Klaksvík:<br>Umvæling av fýrrúmi, ventilatiónsskipan og stýring til hitaverkið og heita vatnið. | 1.148.024 |
| 6) Suðuroyar Sjúkrahús og røktarheim:<br>Sett upp hitamátarar og streymmátarar á bygningarnar. Skift ketil. | 895.111 |
| 7) Kringvarp Føroya:<br>Út- og umbygt hitaverkið. | 885.991 |

| Heiti | Roknskapur |
|---|---|
| 8) A-bygningur, Landssjúkrahúsið: Skift vindeyguni, umframt at málaraarbeiði er gjørt í hesum sambandi. Harumframt hevur arkitektafelag givið ymiska ráðgeving. | 788.708 |
| 9) Tekniski skúli í Klaksvík: Stýring til hitaverkið og heita vatnið er sett upp, umframt at termorútar eru skiftir út. | 651.658 |
| 10) Nýggju læknahúsini hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi: Skift vindeygu, bjálva takrúmini. Sett stýring upp til hitaverkið og heita vatnið. | 534.552 |
| 11) Sambýlið, Kelduskákið í Klaksvík: Eykabjálving av útveggum, lofti og kjallaragólvi. | 479.450 |
| 12) Kanningar og skrásetingar: Støðumetingar, skrásetingar og ymiskar mátingar av fleiri almennum bygningum kring landið. | 427.385 |
| 13) Starvsfólkabygningur á Klaksvíkar Sjúkrahúsi: Bjálvað takrúmið og seti stýring upp á hitaverkinum og heita vatninum. Eisini eru ábøtur gjørdar á el-skipanina. | 404.142 |
| 14) Klaksvíkar sjómansskúli: Sett upp stýring til hitaverk, bjálva takrúm og sett nýggja ventilatións-skipan upp. | 368.536 |
| 15) Norðoya Ellisheim: Skift termorútar, bjálva tekju. | 175.886 |
| **Tilsamans** | **15.131.674** |

Sambært Búskaparskipan Landsins eru á hesari høvuðskontu bókaðar 170 t.kr. í lønum til starvsfólk hjá Landsverki, og 60 t.kr. í sambandi við eina ráðstevnu.

Viðvíkjandi lønarútreiðslunum verður víst til viðmerkingarnar undir høvuðskontu 15.11.1.56. “Umvæling av almennum bygningum (løgujáttan)”.

Viðvíkjandi útreiðslum til ráðstevnu hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at í mai 2009 varð ein ráðstevna hildin um orkusparandi tiltøk, har m.a. starvsfólk frá Landsverki tóku lut. Fólk komu m.a. úr Danmark at halda fyrilestrar um orkusparandi tiltøk.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina skal játtanin nýtast til at byrja eitt miðvíst arbeiði fyri at minka um orkunýtsluna í almennum bygningum. Játtanin kann verða nýtt bæði til bjálving og til at fáa upphiting úr alternativum orkukeldum.

Í viðmerkingunum eru mettu útreiðslurnar “játtaðar” á standardkontu 31 “Bygging og løguframleiðsla”.

Sundurgreiningin á standardkontur í viðmerkingunum til fíggjarlógina er ikki bindandi, men Løgtingið má rokna við, at játtanin verður brúkt, sum greitt frá í viðmerkingunum til fíggjarlógina, soleiðis sum standardkonta 31 er allýst í konteringarleiðbeiningini til Kontuskipan Landsins, og ikki til beinleiðis keyp av vørum og tænastum (standard-konta 14).

Landsgrannskoðanin heldur tí, at útreiðslur til ráðstevnu eru fyrisitingarútreiðslur, sum áttu at verið hildnar av høvuðskontu 18.38.1.02. “Landsverk (rakstrarjáttan)”.

Ad 04) Orkunýtsla í almennum bygningum

Nýttar eru 1,4 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum eru hetta útreiðslur til at skráseta og til forkanningar, sum neyðugar vóru at gera fyri at kunna fara undir at bjálva landsins bygningar.

Av tí at hetta arbeiði var ein generell kanning av nógvum bygningum, varð hildið, at rættast var at bóka útreiðslurnar sum egin verkætlan.

Ad 8) A-bygningur Landssjúkrahúsið

Nýttar eru 789 t.kr.

Vit spurdu, hví útreiðslurnar eru bókaðar á hesa høvuðskontu, í staðin fyri á høvuðskontu 11.20.3.08. “Landssjúkrahúsið, útbygging (løgujáttan)”, sum er ætlað til útbygging, umbygging og umvæling av Landssjúkrahúsinum.

Í maj 2010 hevur landsstýrismaðurin svarað:

> *“Umvælingin av A-bygninginum hevur snúð seg um at skifta vindeyguni út, umframt at málaraarbeiði er gjørt í hesum sambandi. Harumframt hevur arkitektafelag givið ymiska ráðgeving.*
>
> *Hetta arbeiði hevur tí einki við høvuðsumvælingina á Landssjúkrahusinum (klimaskermin) at gera.”*

Landsgrannskoðanin skal vísa á viðmerkingar sínar undir “Umvæling av almennum bygningum”.

Ad 10) Nýggju læknahúsini hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi

Nýttar eru 535 t.kr.

Vit spurdu, hví útreiðslurnar eru bókaðar á hesa høvuðskontu í staðin fyri á høvuðskontu 11.20.3.11. “Klaksvíkar Sjúkrahús (løgujáttan)”, sum m.a. er ætlað til at viðlíkahalda læknahúsini.

Í maj 2010 hevur landsstýrismaðurin svarað:

> *“Arbeiðið hevur umfatað at skifta vindeygu, bjálva takrúm og gera stýring til hitaverk og heitt vatn. Landsverk umsitur ikki høvuðskontu 11.20.3.11. (Løgujáttan).”*

Í viðmerkingunum til fíggjarlógina verður Løgtingið kunnað um, at játtanin 1 mió.kr. á høvuðskontu 11.20.3.11. “Klaksvíkar Sjúkrahús (løgujáttan)” m.a.er ætlað til:

> *Framhaldandi viðlíkahald av starvsfólkahúsum, yvirlæknahúsinum og einum dupulthúsi omanfyri Víkavegin. Hetta arbeiði byrjaði í 2006.*
>
> *Ongar størri ábøtur ella broytingar eru gjørdar við starvsfólkahúsini, uttan at skrivstovur til fyrisiting og onkur kanningarrúm eru innrættað. Húsini eru bygd í 1960.*
>
> *Yvirlæknahúsini eru bygd í 1928 og eru ikki í góðum standi. Takið er tó nýtt. Neyðugt er at bjálva og klæða húsini og møguliga at skifta vindeyguni o.a.*
>
> *Dupulthúsini omanfyri vegin eru gomul sethús, ið sjúkrahúsið hevur ognað sær fyri mongum árum síðani. Sunnari partur av húsunum má innrættast.”*

Landsgrannskoðanin hevur ilt við at skilja svarið frá landsstýrismanninum, og undrast á, at peningur verður nýttur á høvuðskontu “orkunýtsla í almennum bygningum”, vísandi til viðmerkingarnar í fíggjarlógini. Um Landsverk hevur ræðisrætt á høvuðskontu 11.20.3.11. “Klaksvíkar Sjúkrahús (løgujáttan)” ella ikki, er málinum óviðkomandi.

Í juni 2010 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Landsverk visti, at 1,0 mió kr. vóru játtaðar til at umvæla henda bygning. Landsverk setti seg í samband við Heilsumálaráðið, men ráðið segði seg einki vita um málið. Landsverk vendi sær tí til Klaksvíkar Sjúkrahús, men fekk at vita frá teimum, at tey sjálvir vildu umsita hesa játtan.

Í sambandi við fyrr nevndu tørvslýsing vísti tað seg, at stórur tørvur var á at gera ábøtur í sambandi við orkusparandi tiltøk. Tí setti Landsverk arbeiðið í gongd.

Ad 11) Sambýlið Kelduskákið í Klaksvík

Nýttar eru 480 t.kr.

Vit spurdu, hví útreiðslurnar eru bókaðar á hesa høvuðskontu í staðin fyri á høvuðskontu 12.21.6.02. “Bústovnar o.a. (løgujáttan)”, sum m.a. er ætlað til til umbygging av húsi í Klaksvík til børn við autismu.

Í maj 2010 hevur landsstýrismaðurin svarað:

> *“Talan er um eina eyka bjálving av útveggum, lofti og kjallaragólvi. Hesar útreiðslurnar hava ikki verið mettar at vera partur av løgujáttanini á høvuðskonto 12.21.6.02.”*

Landsgrannskoðanin hevur ilt við at skilja sjónarmiðið hjá landsstýrismanninum. Landsgrannskoðanin hevur fyrr umrøtt húsið í Klaksvík til børn við autismu í drúgvari frágreiðing. Talan er um eina heildarætlan at umbyggja húsini.

Landsgrannskoðanin heldur, at allar útreiðslur, sum viðvíkja umbyggingina av húsunum, skulu verða bókaðar á høvuðskontu 12.21.6.02. “Bústovnar o.a. (løgujáttan)”, sum m.a. er ætlað til at byggja um hús í Klaksvík til børn við autismu.

Í juni 2010 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at hóast talan var um eina heildarætlan, sum varð gjørd í sambandi við hesa umfatandi umbygging, so eru útreiðslur komnar aftrat til orkusparandi tiltøk, sum heildarætlanin ikki hevði tikið hædd fyri. Ein betri bjálving av útveggum, loftum og gólvum eru tiltøk, sum tálma orkunýtsluna munandi.

Tá so Landsverk hevði eina játtan júst til endamálið, varð peningur settur av til hesa ætlan og útreiðslurnar bókaðar á hesa kontu. Innlendismálaráðið heldur heimild vera fyri at brúka pening til endamálið av játtanini til orkunýtslu í almennum bygningum.

Ad 13) Starvsfólkabygningur hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi

Nýttar eru 404 t.kr. til Starvsfólkabygning, Klaksvíkar Sjúkrahús.

Vit spurdu, hví útreiðslurnar eru bókaðar á hesa høvuðskontu í staðin fyri á høvuðskontu 11.20.3.11. “Klaksvíkar Sjúkrahús”, sum m.a. er ætlað til at halda starvsfólkahús viðlíka.

Landsstýrismaðurin hevur somu viðmerkingar, sum til útreiðsluna til nýggju læknahúsini hjá Klaksvíkar Sjúkrahús. Landsgrannskoðanin skal vísa á viðmerkingar sínar til hetta málið.

### 9.1.4 Almennar viðmerkingar til løgujáttanir til bygningar

Viðmerkingar frá landsstýrismanninum

Landsstýrismaðurin hevur víst á, at játtanin á høvuðskontu 15.11.1.56. "Umvæling av almennum bygningum (løgujáttan)" 12,0 mió.kr., varð brúkt til 37 ymisk endamál/verkætlanir í 2009. 4 av hesum bygningum høvdu eisini løgujáttan á øðrum kontum. Játtanin á høvuðskontu 15.37.4.10. "Orkunýtsla í almennum bygningum (løgujáttan)" 15,0 mió.kr. varð brúkt til 15 ymisk endamál/verkætlanir í 2009. Tríggir av hesum bygningum høvdu eisini løgujáttan á øðrum høvuðskontum.

Sostatt vórðu játtanirnar til bygningar, 27,0 mió kr., brúktar til 52 endamál. Av hesum til 7 bygningar, sum eisini høvdu løgujáttan á øðrum kontum.

*Orkunýtsla og umvæling*

Landsstýrismaðurin heldur, at endamálini við játtanunum á høvuðskontunum 15.37.4.10. "Orkunýtsla í almennum bygningum (løgujáttan)" og 15.11.1.56. "Umvæling av almennum bygningum (løgujáttan)" eru rættiliga meinlík, og játtanirnar eru tí í 2010 lagdar saman í eina játtan.

Bygningar landsins eru yvirhøvur í ringum standi, tí í nógv ár hevur alt ov lítið verið játtað til viðlíkahald. Harafturat eru nógvir bygningar illa bjálvaðir, soleiðis at orkunýtslan er óneyðuga stór. Tørvur er sostatt bæði á at umvæla og bjálva nógvar av landsins bygningum.

Tá bjálvað verður, verður í stóran mun eisini umvælt, og øvugt. Tað ber ikki til bert at bjálva ein bygning, um t.d. veggir ella vindeygu eru farin. Tað er eisini trupult at allýsa, júst hvat er bjálving og hvat er viðlíkahald.

*Løgur í bygningar annars*

Sambært landsstýrismanninum er markamótið millum nevndu kontur (bjálving og umvæling), og løgur í bygningar annars á fíggjarlógini, er ikki knívskorið.

Ein rættiliga neyv meting verður gjørd fyri hvørja verkætlan sær, hvar útreiðslurnar skulu verða bókaðar, har sum tað bæði er ein serstøk løgujáttan til ein landsbygning, og peningur eisini er játtaður á aðrari kontu til sama bygningin, eitt nú til umvæling.

*Ábyrgd*

Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at sjálvt um Landsverk hevur ræðisrættin á bygningunum, sum verða nevndir í frágreiðingini, so standa játtanirnar á øðrum greinum í fíggjarlógini, og viðkomandi landsstýrisfólk varða av bygningunum, tí tað er teirra málsøki.

*Heimild.*

Landsstýrismaðurin heldur, at viðmerkingarnar til játtanirnar á § 15. Innlendismál eru breitt orðaðar, og avmarka ikki á nakran hátt Landsverk til bert at brúka pening, har ongin serskild løgujáttan er annars. Tað verður yvirhøvur víst til "bygningar landsins" í breiðum høpi. Tí hevur Landsverk greiða heimild at brúka játtanirnar.

Í samskiftinum í sambandi við fíggjarlógina fyri 2009, sum Innlendismálaráðið, hevur havt við landsstýrið, Fíggjarmálaráðið og Fíggjarnevndina viðvíkjandi "bygnings-játtanunum", hevur tað ongantíð verið skilt soleiðis, at játtanirnar eru markaðar til ávísar bygningar.

Tað kann fáa stórar avleiðingar fyri tey arbeiði, sum eru í gongd í ár, um peningur ikki kann verða brúktur av játtanini til umvæling av almennum bygningum, har serjáttan annars er, tí í 2010 verður sama mannagongd brúkt, sum í 2009.

### *Bókingar og gagn*

Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at tað snýr seg ikki bert um bókingar, men eisini um hvør nytta fæst burtur úr játtanum landsins. Hvar átrokandi tørvur er á at gera løgur. Tað liggur eisini á Innlendismálaráðnum/ Landsverki at nýta játtanir landsins optimalt. Tí eigur málið at verða lýst í breiðari høpi.

### Viðmerkingar frá Landsgrannskoðanini

Landsgrannskoðanin skal viðmerkja, at vit ikki hava sett spurnartekin við, um Landsverk hevur heimild at brúka játtanir, sum greitt frá frammanfyri. Landsgrannskoðanin er púra samd við landsstýrismanninum í, at nógvir almennir bygningar eru í ringum standi, tí ov lítið hevur í nógv ár verið játtað til viðlíkahald.

Hinvegin halda vit, at tá ið tað í fíggjarlógini, í viðmerkingunum til eina verklagslóg ella eina løgukontu, greitt verður kunnað um endamálið við lógini/játtanini, er tað ikki altíð skilagott, at útreiðslur til sama endamál kunnu verða bókaðar á kontur til generelt viðlíkahald.

Landsgrannskoðanin heldur ikki, at roknskapurin verður nóg gjøgnumskygdur, tá ein stovnur ella aðalráð spjaðir viðlíkahaldsútreiðslur á aðrar játtanir, ið stovnurin hevur ræði á. Tílík bókingarmannagongd, sum hevur verið nýtt í 2009, kann avlaga og grugga landsroknskapin.

## 9.2 Minninýtsla/frávik

### 9.2.1 Nýggir landsvegir (løgujáttan) 15.38.1.07.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 58,5 mió.kr. til útreiðslur og 0,1 mió.kr. til inntøkur. Minninýtslan er 21,2 mió.kr.netto.

Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 92,5 mió.kr. til útreiðslur og 0,1 mió.kr. til inntøkur. Í eykajáttanarlógini apríl 2009 varð útreiðslujáttanin lækkað 34 mió.kr.

Í eykajáttanarlógini september 2009 varð skotið upp at lækka játtanina 450 t.kr. netto og fremja broytingar í C. átekningini. Fíggjarnevndin mælti frá og setti fram broytingaruppskot, ið varð samtykt.

Í fíggjarlógini er ein C–átekning, ið ásetur verkætlanir, sum eru játtaðar:

mió.kr.

| Endamál | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Øravík-Hov | 2,6 | -1,0 | -3,6 |
| Dagføring av brúm og tunlum | 4,6 | 4,5 | -0,1 |
| Trygdartiltøk, størri ábøtur og til at taka | 7,5 | 7,2 | -0,3 |
| Vegagerð í Leirvík | 11,0 | 1,4 | -9,6 |
| Vegagerð í Kalsoy, vegir, tunlar og havnir | 5,5 | 3,9 | -1,6 |
| Hvalbiartunnilin | 1,5 | 0,8 | -0,7 |
| Brúgvin um Streymin | 7,0 | 7,0 | - |
| Leynatunnilin | 2,8 | 2,7 | -0,1 |
| Norð um Fjall (byrging um Haraldsund) | 4,0 | 2,9 | -1,1 |
| Skálavík, brimverja | 1,0 | 1,0 | - |
| Vegurin omanfyri Skálafjørð | 5,0 | 1,0 | -4,0 |
| Kanning av Skálafjarðartunlinum | 1,0 | 0,9 | -0,1 |
| Rituvíkarvegurin | 5,0 | 4,9 | -0,1 |
| **Tilsamans** | **58,5** | **37,2** | **-21,3** |

Á talvuni sæst, at har minst er nýtt í mun til játtanina er:

a) 9,6 mió.kr. vegagerð í Leirvík,
b) 4,0 mió.kr. vegurin omanfyri Skálafjørð,
c) 3,6 mió.kr. Øravík-Hov, og
d) 1,6 mió.kr. vegagerð í Kalsoy, vegir, tunlar og havnir.

Ad a) Vegagerð í Leirvík

Sambært landsstýrismanninum varð upphæddin, 1,4 mió.kr., sum varð brúkt í 2009, brúkt til prosjektering.

Í mai 2010 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at semja er gjørd millum Landsverk (Innlendismálaráðið) og Eysturkommunu. Materiella heimildin er fingin til vega at fara undir og at fullføra vegagerðina, og fíggjarlig heimild er at fara undir sjálva vegagerðina í 2010.

Ad b) Vegurin omanfyri Skálafjørð

Sambært landsstýrismanninum varð verkætlanin boðin út, men tá tilboðini komu inn, vísti tað seg, at kostnaðurin var væl hægri, enn verklagslógin heimilaði. Harumframt varð ikki møguligt at fáa semju í lag um keyp av lendinum, sum skal brúkast til vegagerðina. Sostatt hevði ikki borið til at farið undir verkætlanina, hóast kostnaðurin hevði verið samsvarandi verklagslógini.

Ad c) Øravík-Hov

Sambært Búskaparskipan Landins eru bókaðar útreiðslur 3,5 mió.kr. og inntøkur 4,5 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum gjørdist annar portalurin til tunnilin Øravík-Hov ov stuttur. Orsøkin var at verkætlanin var skeivt prosjekterað, og byggingin tí eisini skeiv. Tessvegna mátti arbeiðið verða gjørt av nýggjum.

Landsverk heldur, at prosjekteringsfelagið eigur at gjalda meirkostnaðin, og rokning er tí send felagnum. Endurgjaldskravið er inntøkuført á verkætlanina.

### 9.2.2 Stuðul til infrakervið á útoyggjum 15.38.1.18.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 3.550 t.kr. Minninýtslan er 130 t.kr.

Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 3.100 t.kr. Í eykajáttanarlógini september 2009 varð játtanin hækkað 450 t.kr. til at gera eitt reinsiverk í Skúvoy.

Sambært landsstýrismanninum bleiv arbeiðið við lendingini í Mykinesi bíligari, enn mett frammanundan.

### 9.2.3 Sandoyartunnil (løgujáttan) 15.38.2.23.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2.000 t.kr. At kalla ongin peningur er brúktur, og minninýtslan er 1.920 t.kr.

Í mai 2010 hevur landsstýrismaðurin hesa frágreiðing:

> *"Í 2008 vóru 6,0 mió kr. játtaðar til framhaldandi forkanningar í sambandi verkætlanina at gera undirsjóvartunnil um Skopunarfjørð. Nýtslan var 1,6 mió kr.*
>
> *Millum annað skuldu vatnrættar kjarnuboringar gerast, og aðrar kanningar, sum bert fá feløg í heiminum kunnu fremja. Tí var trupult at fáa avtalu í lag. Seint út á árið 2008 var funnið fram til eina fyritøku, men var tá so langt útliðið á árið, at ongin møguleiki var fyri at fáa tað gjørt, tí kanningarnar taka rúma tíð, og kunnu bert gerast í besta veðri.*
>
> *Eftir fíggjarlógaruppskotinum fyri 2009 skuldu 2,0 mió kr. játtast á høvuðskontuni. Í álitinum frá meirilutanum í fíggjarnevndini verður skrivað: "Av hesari játtan kann landsstýrið fara undir at seta á stovn partafelag".*
>
> *Tilskilað verður ikki hvussu stór upphæddin skuldi vera til tað endamálið. Innlendismálaráðið metti seg leysliga at kunna brúka helmingin av játtanini til at stovna partafelagið og at Landsverk sostatt kundi brúka 1,0 mió kr. til forkanningar.*
>
> *Løgtingslóg nr 61. frá 25. mai 2009 "um at gera partafelag at gera fast samband um Skopunarfjørð" heimilaði landsstýrismanninum at stovna felagið. Av ymsum ávum var partafelagið tó ikki stovnað.*
>
> *Sum greitt frá um nýtsluna í 2008, so tørvar enn at gera nakrar stýrdar kjarnuboringar. Væntandi koma hesar kanningar at kosta umleið 6,0 mió.kr. og av tí at bert vóru játtaðar 1,0 mió.kr. í 2009, hevur ikki verið møguligt at seta hesar kanning í verk. Serligt skip skal fást til vega til slíkar kanningar, og kostnaðurin av hesum er sera stórur."*

# 10 UTTANRÍKISMÁL

## 10.1 Meirnýtsla/frávik

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| SamVit (rakstrarjáttan) | 13.935 | 14.178 | 243 |

### 10.1.1 SamVit (rakstrarjáttan) 16.37.1.03.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 13.935 t.kr. Meirnýtslan er 243 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 12.935 | 12.932 | -3 |
| 21. Marknaðarføring | 1.000 | 800 | -200 |
| 40. Verkætlanir | - | 446 | 446 |
| **Tilsamans** | **13.935** | **14.178** | **243** |

Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 14.935 t.kr. Í eykajáttanarlógini apríl 2009 varð játtanin lækkað 1.000 t.kr.

Undirkonta 21. Marknaðarføring

Á hesari undirkontu eru minniútreiðslurnar 200 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum vóru tvær játtaðar umsóknir ikki gjøgnumførdar, og tvær gjørdust bíligari enn roknað varð við.

Undirkonta 40. Verkætlanir

Á hesari undirkontu eru meirútreiðslurnar 446 t.kr.

Árini 2007 – 2009 hevur SamVit, og í 2009 Uttanríkisráðið, umsitið játtanirnar, sum Vinnuframagrunnurin hevur latið til verkætlanir.

Flestu verkætlanirnar taka fleiri ár at fremja, og endaligur roknskapur er ikki tøkur, fyrr enn verkætlanin er liðug og gjørd upp. Tá ber til at staðfesta, um kostnaðurin er innanfyri tað, sum Vinnuframagrunnurin játtaði.

Við árslok 2009 vóru flestu verkætlanirnar lidnar og gjørdar upp, og nakrar høvdu meirnýtslu.

# 11 Samlað yvirlit meir-/minninýtsla

Yvirlitið niðanfyri vísir meir-/minninýtsluna á øllum høvuðskontum í landsroknskapinum. Høvuðskontur, har eingin meir- ella minninýtsla er, eru ikki tiknar við. Viðvíkjandi inntøkum verður víst til brotið undir Fíggjarmálaráðnum.

Í frágreiðingini frammanfyri er greitt frá teimum mest týðandi frávikunum.

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla | Minninýtsla |
|---|---|---|---|---|
| **Løgmansfyrisitingin** | | | | |
| Løgmansskrivstovan (rakstrarjáttan) | 7.947 | 7.874 | | 73 |
| Viðlíkahald (rakstrarjáttan) | 350 | 318 | | 32 |
| Løgmaður og landsstýrið (rakstrarjáttan) | 6.920 | 6.701 | | 219 |
| **Fíggjarmál** | | | | |
| Fíggjarmálaráðið (rakstrarjáttan) | 8.817 | 8.806 | | 11 |
| Viðlíkahald (rakstrarjáttan) | 318 | 283 | | 35 |
| Sáttmálaviðurskifti (rakstrarjáttan) | 400 | 251 | | 149 |
| TAKS (rakstrarjáttan) | 67.560 | 67.259 | | 301 |
| Føroya gjaldstova (rakstrarjáttan) | 24.311 | 24.162 | | 149 |
| Búskaparráðið (rakstrarjáttan) | 432 | 228 | | 204 |
| Umsiting av ogn og skuld landsins (rakstrarjáttan) | 1.704 | 1.170 | | 534 |
| Hagstova Føroya (rakstrarjáttan) | 10.626 | 10.687 | 61 | |
| Tænastumannaeftirlønir (lógarbundin játtan) | 19.950 | 19.712 | | 238 |
| Eftirlønir (lógarbundin játtan) | 500 | 490 | | 10 |
| Danskar eftirlønir (lógarbundin játtan) | 1.600 | 1.372 | | 228 |
| Eftirløn landsstýrismanna (lógarbundin játtan) | 1.500 | 1.413 | | 87 |
| Lønarforskot (stuðulsjáttan) | - | -3 | | 3 |
| Eftirlønir innan heilsuverkið (lógarbundin játtan) | 12.500 | 12.037 | | 463 |
| Stuðul til flutning og dupult húsarhald (lógarbundin játtan) | 19.000 | 19.117 | 117 | |
| Útgjald úr Trygdargrunninum (lógarbundin játtan) | 500 | 402 | | 98 |
| Rentustudningur til húsabygging (lógarbundin játtan) | 825 | 484 | | 341 |
| Stuðul til ren tuútreiðslur (lógarbundin játtan) | 113.000 | 112.979 | | 21 |
| Stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði (lógarbundin játtan) | 28.000 | 28.036 | 36 | |
| Lán til Húsalánsgrunnin | -1.667 | -1.670 | | 3 |
| Læraraeftirlønir (lógarbundin játtan) | 49.000 | 48.002 | | 998 |
| FAS-endurgjald (lógarbundin játtan) | 80.300 | 77.968 | | 2.332 |
| KT-fyrisiting (rakstrarjáttan) | 5.120 | 5.118 | | 2 |

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla | Minninýtsla |
|---|---|---|---|---|
| **Fiskivinnumál** | | | | |
| Fiskimálaráðið (rakstrarjáttan) | 15.033 | 14.984 | | 49 |
| Viðlíkahald (rakstrarjáttan) | 500 | 530 | 30 | |
| Granskingarætlanir (rakstrarjáttan) | 3.634 | 3.328 | | 306 |
| Tilbúgvingarsamskipanin (rakstrarjáttan) | 18.135 | 17.304 | | 831 |
| Veðurtænastan (rakstrarjáttan) | 2.900 | 3.156 | 256 | |
| Almennar royndir og ráðgeving (rakstrarjáttan) | 2.763 | 2.747 | | 16 |
| Innsavnan av ull og skinnum (stuðulsjáttan) | 750 | 287 | | 463 |
| Búnaðarstovan (rakstrarjáttan) | 2.945 | 2.884 | | 61 |
| Almenn jørð, søla (løgujáttan) | 0 | 20 | | 20 |
| Fiskivinnuráð og nevndir (rakstrarjáttan) | 450 | 370 | | 80 |
| Upplýsing um grind (rakstrarjáttan) | 425 | 409 | | 16 |
| Hvalagransking og hvalateljing v.m. (rakstrarjáttan) | 975 | 977 | 2 | |
| Lønjavningarstovan (rakstrarjáttan) | 2.955 | 2.424 | | 531 |
| Fiskiveiðieftirlitið (rakstrarjáttan) | 43.463 | 42.793 | | 670 |
| Havstovan (rakstrarjáttan) | 11.518 | 11.709 | 191 | |
| Magnus Heinason (rakstrarjáttan) | 11.281 | 11.244 | | 37 |
| Nýtt havrannsóknarskip (løgujáttan) | 800 | 804 | 4 | |
| Fiskivinnuroyndir (rakstrarjáttan) | 5.054 | 5.034 | | 20 |
| Inntøkutrygd hjá fiskimonnum (lógarbundin játtan) | 42.000 | 35.807 | | 6.193 |
| Sjúkratrygd (lógarbundin játtan) | 5.500 | 4.685 | | 815 |
| Flutningsstuðul (lógarbundin játtan) | 3.200 | 2.969 | | 231 |
| Útlán (stuðulsjáttan) | -2.500 | -2.072 | 428 | |
| Effektivar veðhaldsútreiðslur (stuðulsjáttan) | -100 | -96 | 4 | |
| Trygdarmiðstøðin (rakstrarjáttan | 2.640 | 2.974 | 334 | |
| Trygdarmiðstøðin (løgujáttan) | 12.000 | 11.991 | | 9 |
| **Vinnumál** | | | | |
| Vinnumálaráðið (rakstrarjáttan) | 10.085 | 10.087 | 2 | |
| Viðlíkahald (rakstrarjáttan) | 200 | 170 | | 30 |
| Javnstøðunevndin (rakstrarjáttan) | 460 | 467 | 7 | |
| Kvinnuluttøka í politikki (rakstrarjáttan) | 400 | 402 | 2 | |
| Vanlukkutryggingarráðið (rakstrarjáttan) | 0 | -66 | | -66 |
| Jarðfeingi (rakstrarjáttan) | 17.203 | 15.721 | | 1.482 |
| Søla av seismiskum kanningarúrslitum (stuðulsjáttan) | -75 | 0 | 75 | |
| Djóralæknatænastur (rakstrarjáttan) | 1.100 | 1.027 | | 73 |

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla | Minninýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Sjóvinnufyrisitingin (Skipaskrásetingin) (rakstrarjáttan) | 595 | 273 | | 322 |
| Skipaeftirlitið (rakstrarjáttan) | 7.899 | 7.892 | | 7 |
| P/f Fiskaaling (stuðulsjáttan) | 7.000 | 7.541 | 541 | |
| Fiskasjúkutænastur (rakstrarjáttan) | 4.017 | 4.018 | 1 | |
| Avtøka av endurgjaldsgrunni alivinnunar (stuðulsjáttan) | -7.000 | -7.541 | | 541 |
| Sáttmálaeftirlit (rakstrarjáttan) | 75 | 49 | | 26 |
| Loyvisnevndin (rakstrarjáttan) | 200 | 197 | | 3 |
| El-nevndin (rakstrarjáttan) | 190 | 200 | 10 | |
| Brúkaraumboð (rakstrarjáttan) | 1.200 | 1.205 | 5 | |
| Kappingarráðið (rakstrarjáttan) | 1.908 | 1.894 | | 14 |
| Skráseting Føroya (rakstrarjáttan) | 1.997 | 545 | | 1.452 |
| Endurgjald til skipasmíð (stuðulsjáttan) | 500 | 342 | | 158 |
| Rúsdrekkasøla landsins (rakstrarjáttan) | -11.848 | -11.731 | 117 | |
| Heilsufrøðiliga starvsstovan (rakstrarjáttan) | 16.846 | 16.829 | | 17 |
| Umbygging av Heilsufrøðiligu starvsstovuni (løgujáttan) | 6.000 | 6.236 | 236 | |
| Lánsafturgjald (stuðulsjáttan) | -2.500 | -86 | 2.414 | |
| Strandfaraskip landsins (rakstrarjáttan) | 117.203 | 117.089 | | 114 |
| Strandfaraskip landsins (løgujáttan) | 6.550 | 4.357 | | 2.193 |
| Postverk Føroya, eftirlønir (lógarbundin játtan) | 5.100 | 5.791 | 691 | |
| Semingsmannaskipanin (rakstrarjáttan) | 200 | 182 | | 18 |
| Arbeiðseftirlitið (rakstrarjáttan) | 3.481 | 3.476 | | 5 |
| Barsilsskipan (lógarbundin játtan) | 86.400 | 90.893 | 4.493 | |
| Umsiting av barsilsskipan (rakstrarjáttan) | 1.586 | 1.696 | 110 | |
| **Mentamál** | | | | |
| Mentamálaráðið (rakstrarjáttan) | 16.631 | 16.532 | | 99 |
| Viðlíkahald (rakstrarjáttan) | 4.400 | 4.390 | | 10 |
| ES samstarv (rakstrarjáttan) | 640 | 637 | | 3 |
| Stuðulsstovnurin (rakstrarjáttan) | 3.684 | 3.687 | 3 | |
| Ymiskar felagsútreiðslur (rakstrarjáttan) | 2.608 | 2.573 | | 35 |
| Landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð (rakstrarjáttan) | 4.695 | 4.433 | | 262 |
| Útgerð til yrkisskúlar og hægri útbúgvingar (rakstrarjáttan) | 2.008 | 2.003 | | 5 |
| KT í skúlaverkinum (rakstrarjáttan) | 2.296 | 2.277 | | 19 |
| Skúlabókagerð (rakstrarjáttan) | 630 | 535 | | 95 |
| Skúlabókagrunnurin (rakstrarjáttan) | 6.539 | 6.302 | | 237 |
| Próvtøkur (rakstrarjáttan) | 7.608 | 7.816 | 208 | |

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla | Minninýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Eftirútbúgving og skeið (rakstrarjáttan) | 359 | 125 | | 234 |
| Næmingaheim (stuðulsjáttan) | 223 | 214 | | 9 |
| Fólkaskúlin (rakstrarjáttan) | 270.918 | 270.554 | | 364 |
| Sernámsdepilin (rakstrarjáttan) | 59.881 | 59.802 | | 79 |
| Stuðul til fólkaskúlar (stuðulsjáttan) | 6.472 | 6.034 | | 438 |
| Skúlatilboð til ung við breki (rakstrarjáttan) | 2.150 | 2.129 | | 21 |
| Eftirskúlar (løgujáttan) | 2.000 | 0 | | 2.000 |
| Skúlin á Trøðni (løgujáttan) | 1.500 | 1.492 | | 8 |
| Miðnámsútbúgvingar (rakstrarjáttan) | 166.511 | 165.012 | | 1.499 |
| Tekniski skúli í Klaksvík (løgujáttan) | 1.000 | -182 | | 1.182 |
| Fiskivinnuskúlin (løgujáttan) | 0 | -852 | | 852 |
| Skúladepil í Marknagili (løgujáttan) | 5.000 | 5.007 | 7 | |
| Studningur til lærupláss (lógarbundin játtan) | 15.010 | 14.616 | | 394 |
| Gjald fyri lærusáttmálar o.a. (stuðulsjáttan) | -1.020 | -528 | 492 | |
| Ferðaendurgjald til lærupláss (lógarbundin játtan) | 1.280 | 1.362 | 82 | |
| Studentaskúlin í Hoydølum (løgujáttan) | 5.500 | 5.864 | 364 | |
| Føroya fólkaháskúli (stuðulsjáttan) | 2.613 | 2.445 | | 168 |
| Húsarhaldsskúlar (stuðulsjáttan) | 2.124 | 1.926 | | 198 |
| Frítíðarundirvísing (rakstrarjáttan) | 6.219 | 6.003 | | 216 |
| Musikkskúlar (rakstrarjáttan) | 11.288 | 11.110 | | 178 |
| Klaksvíkar sjómansskúli (løgujáttan) | 1.000 | 800 | | 200 |
| Klaksvíkar sjómansskúli (rakstrarjáttan) | 4.023 | 3.967 | | 56 |
| Maritimir skúlar (rakstrarjáttan) | 18.344 | 18.343 | | 1 |
| Almanna- og heilsuskúli Føroya (rakstrarjáttan) | 13.290 | 13.254 | | 36 |
| Læraraskúlin (rakstrarjáttan) | 22.745 | 22.962 | 217 | |
| Fróðskaparsetur Føroya (rakstrarjáttan) | 29.454 | 29.423 | | 31 |
| Biofar (rakstrarjáttan) | 1.643 | 1.640 | | 3 |
| Granskingarráð Føroya (rakstrarjáttan) | 2.300 | 2.209 | | 91 |
| Lestrarstuðul (lógarbundin játtan) | 92.391 | 92.843 | 452 | |
| Tiltøk fyri børn og ung (stuðulsjáttan) | 0 | -35 | | 35 |
| Málnevndin (rakstrarjáttan) | 422 | 421 | | 1 |
| Ymiskir studningar (stuðulsjáttan) | 3.098 | 2.874 | | 224 |
| Miðlaráðið (rakstrarjáttan) | 362 | 350 | | 12 |
| Umsiting av Mentanargrunninum (rakstrarjáttan) | 423 | 399 | | 24 |
| Leiklist (rakstrarjáttan) | 5.058 | 5.189 | 131 | |
| Týðaragrunnur Landsins (stuðulsjáttan) | 500 | 304 | | 196 |

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla | Minninýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Heiðursgávur til mentafólk (stuðulsjáttan) | 500 | 453 | | 47 |
| Sjónleikarhús (stuðulsjáttan) | 125 | 98 | | 27 |
| Bókasøvn (rakstrarjáttan) | 12.962 | 12.777 | | 185 |
| Bókasøvn (løgujáttan) | 1.250 | 1.217 | | 33 |
| Føroya landsskjalasavn (rakstrarjáttan) | 2.850 | 2.848 | | 2 |
| Føroya fornminnissavn (rakstrarjáttan) | 7.358 | 7.414 | 56 | |
| Føroya náttúrugripasavn (rakstrarjáttan) | 3.253 | 3.254 | 1 | |
| Bygdasøvn (stuðulsjáttan) | 3.289 | 2.836 | | 453 |
| Friðað hús og fornminni (rakstrarjáttan) | 1.282 | 1.175 | | 107 |
| Listasøvn (rakstrarjáttan) | 2.487 | 2.486 | | 1 |
| Kirkjubømúrurin (løgujáttan) | 1.000 | 928 | | 72 |
| Kringvarp Føroya (rakstrarjáttan) | - | 725 | 725 | |
| Ítróttahøll á Sandoynni (løgujáttan) | 5.500 | 2.389 | | 3.111 |
| Lánsafturgjald (stuðulsjáttan) | -100 | - | 100 | |
| Kringvarpssendistøðir (rakstrarjáttan) | 1.000 | - | | 1.000 |
| **Heilsumál** | | | | |
| Heilsumálaráðið (rakstrarjáttan) | 10.924 | 10.840 | | 84 |
| Viðlíkahald (rakstrarjáttan) | 1.700 | 1.739 | 39 | |
| Vísindasiðseminevndin (rakstrarjáttan) | 77 | 94 | 17 | |
| KT øki heilsuverksins (rakstrarjáttan) | 5.700 | 5.715 | 15 | |
| Upplýsing og ráðgeving (rakstrarjáttan) | 2.298 | 2.300 | 2 | |
| Koppsetingar (lógarbundin játtan) | 11.825 | 7.581 | | 4.244 |
| Upplýsing um gitnaðarfyribyrging (lógarbundin játtan) | 400 | 463 | 63 | |
| Heilsukanningar av barnakonum (lógarbundin játtan) | 740 | 734 | | 6 |
| Læknakanningar av børnum (lógarbundin játtan) | 700 | 724 | 24 | |
| Sjúkrakassar (stuðulsjáttan) | 25.800 | 24.909 | | 891 |
| Kommunulæknaskipanin (rakstrarjáttan) | 11.422 | 11.907 | 485 | |
| Útbúgving av yngri læknum (rakstrarjáttan) | 5.381 | 5.285 | | 96 |
| Apoteksverkið (rakstrarjáttan) | - | 3.988 | 3.988 | |
| Apoteksverkið (løgujáttan) | 4.000 | 4.001 | 1 | |
| Ílegusavnið (rakstrarjáttan) | 2.594 | 2.575 | | 19 |
| Landssjúkrahúsið (rakstrarjáttan) | 394.442 | 394.420 | | 22 |
| Medicoteknisk tól (løgujáttan) | 7.500 | 7.462 | | 38 |
| Landssjúkrahúsið, útbygging (løgujáttan) | 34.000 | 36.294 | 2.294 | |
| Klaksvíkar sjúkrahús (rakstrarjáttan) | 60.514 | 60.524 | 10 | |
| Klaksvíkar sjúkrahús (løgujáttan) | 1.000 | 1.017 | 17 | |

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla | Minninýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Suðuroyar sjúkrahús (rakstrarjáttan) | 46.939 | 47.249 | 310 | |
| Suðuroyar sjúkrahús (løgujáttan) | 1.500 | 1.208 | | 292 |
| Serviðgerð uttanlands (rakstrarjáttan) | 133.597 | 138.618 | 5.021 | |
| Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu (rakstrarjáttan) | 1.683 | 1.693 | 10 | |
| Viðgerðarstovnurin Heilbrigdi (rakstrarjáttan) | 5.033 | 5.718 | 685 | |
| Viðgerðarstovnurin Blákrossheimið (rakstrarjáttan) | 5.046 | 5.060 | 14 | |
| Lánsafturgjald (stuðulsjáttan) | -79 | 0 | 79 | |
| Gigni heilsufrøði fyri børn & ung (rakstrarjáttan) | 11.143 | 11.220 | 77 | |
| **Almannamál** | | | | |
| Almannamálaráðið (rakstrarjáttan) | 10.217 | 9.789 | | 428 |
| Viðlíkahald (rakstrarjáttan) | 2.450 | 1.995 | | 455 |
| Almannastovan (rakstrarjáttan) | 38.488 | 38.480 | | 8 |
| KT-heildarskipan til Almannastovuna (rakstrarjáttan) | 2.700 | 2.714 | 14 | |
| Hjálpartólamiðstøðin (rakstrarjáttan) | 7.224 | 7.206 | | 18 |
| Dugni-skúlin (rakstrarjáttan) | 3.335 | 3.354 | 19 | |
| Dugni-skúlin (løgujáttan) | 500 | 7 | | 493 |
| Barnavernd (lógarbundin játtan) | 6.110 | 5.908 | | 202 |
| Barnapeningur veittur í forskoti (lógarbundin játtan) | 2.093 | 2.236 | 143 | |
| Stuðul til uppihaldspening (lógarbundin játtan) | 7.953 | 8.805 | 852 | |
| Barnaískoyti (lógarbundin játtan) | 7.113 | 6.854 | | 259 |
| Børn og ung (rakstrarjáttan) | 42.317 | 42.474 | 157 | |
| Ættleiðingarstuðul (lógarbundin játtan) | 850 | 650 | | 200 |
| Ráðgevandi toymi (rakstrarjáttan) | 509 | 449 | | 60 |
| Dagpeningaskipanin (lógarbundin játtan) | 57.054 | 55.196 | | 1.858 |
| Serforsorg (rakstrarjáttan) | 143.657 | 139.442 | | 4.215 |
| Bústovnar o.a. (løgujáttan) | 26.300 | 19.548 | | 6.752 |
| Eldrarøkt (rakstrarjáttan) | 323.176 | 316.745 | | 6.431 |
| Nærverkið, Meginskrivstovan (rakstrarjáttan) | 7.038 | 6.984 | | 54 |
| Ansingarsamsýning (lógarbundin játtan) | 15.802 | 15.071 | | 731 |
| Stuðulstænastan (rakstrarjáttan) | 21.368 | 21.366 | | 2 |
| Vardar íbúðir, rakstrarstudningur (stuðulsjáttan) | 121 | 120 | | 1 |
| Lán til ellis- og røktarheim í Vági (stuðulsjáttan) | 9.300 | 847 | | 8.453 |
| Eldrasambýli (løgujáttan) | 2.800 | 0 | | 2.800 |

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla | Minninýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Serflutningsskipan landsins (stuðulsjáttan) | 947 | 807 | | 140 |
| Dugni-endurbúgving (rakstrarjáttan) | 6.110 | 6.109 | | 1 |
| Sjóndepilin (rakstrarjáttan) | 6.049 | 6.105 | 56 | |
| Vanlig forsorg (lógarbundin játtan) | 163.004 | 156.170 | | 6.834 |
| Fólkapensjón (lógarbundin játtan) | 403.579 | 404.556 | 977 | |
| Fyritíðarpensjón (lógarbundin játtan) | 255.735 | 256.806 | 1.071 | |
| Umsorgararbeiði (stuðulsjáttan) | 2.806 | 2.554 | | 252 |
| Einkjubarnastyrkur (lógarbundin játtan) | 2.210 | 1.888 | | 322 |
| Viðbót til ávísar pensjónistar (lógarbundin játtan) | 24.939 | 24.832 | | 107 |
| Námsfrøðingar í framhaldsútbúgving (rakstrarjáttan) | 288 | 270 | | 18 |
| **Innlendismál** | | | | |
| Landsins ognir (rakstrarjáttan) | -1.575 | -1.540 | 35 | |
| Innlendismálaráðið (rakstrarjáttan) | 12.821 | 12.663 | | 158 |
| Umvæling av almennum bygningum (løgujáttan) | 12.000 | 12.365 | 365 | |
| Lánsafturgjald (stuðulsjáttan) | -35 | -11 | 24 | |
| Ymiskar útreiðslur (rakstrarjáttan) | 1.244 | 1.084 | | 160 |
| Føroya Kærustovnur (rakstrarjáttan) | 5.097 | 5.096 | | 1 |
| Dátueftirlitið (rakstrarjáttan) | 2.000 | 1.968 | | 32 |
| Hin føroyski Happadrátturin (lógarbundin játtan) | -913 | -681 | 232 | |
| Hin føroyski Happadrátturin, fyrisiting (rakstrarjáttan) | 913 | 808 | | 105 |
| Náttúrufriðingarnevndir (rakstrarjáttan) | 314 | 276 | | 38 |
| Lánsafturgjald (stuðulsjáttan) | -3.250 | -3.354 | | 104 |
| Træplanting (stuðulsjáttan) | 450 | 451 | 1 | |
| Stuðul til útoyggjamenning (stuðulsjáttan) | 770 | 765 | | 5 |
| Umhvørvisstovan (rakstrarjáttan) | 19.633 | 19.774 | 141 | |
| Umhvørvisstovan (løgujáttan) | 1.500 | 1.360 | | 140 |
| Orkunýtsla í almennum bygningum (løgujáttan) | 15.000 | 15.132 | 132 | |
| Landsverk (rakstrarjáttan) | 68.418 | 67.545 | | 873 |
| Nýggir landsvegir (løgujáttan) | 58.400 | 37.243 | | 21.157 |
| Havnir (løgujáttan) | 4.400 | 4.306 | | 94 |
| Stuðul til infrakervið á útoyggjum | 3.550 | 3.420 | | 130 |
| Stuðul til útoyggjar (stuðulsjáttan) | 1.000 | 985 | | 15 |
| Sandoyartunnil (løgujáttan) | 2.000 | 80 | | 1.920 |
| Akstovan (rakstrarjáttan) | -900 | -910 | | 10 |

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla | Minninýtsla |
|---|---|---|---|---|
| **Uttanríkismál** | | | | |
| Uttanríkistænastan (rakstrarjáttan) | 26.061 | 26.009 | | 52 |
| Millumtjóða samstarv (stuðulsjáttan) | 2.900 | 2.747 | | 153 |
| Kappingarsamleiki (rakstrarjáttan) | 3.000 | 2.992 | | 8 |
| SamVit (rakstrarjáttan) | 13.935 | 14.178 | 243 | |